# Føroya Arbeiðsgevarafelag
# Ársfrágreiðing 2016

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**

Vinnuhúsið
Óðinshædd 7
Postboks 1038
FO-110 Tórshavn

# Frágreiðing frá nevndini

Staðfestast kann, at gongd er á føroyska búskapinum, og at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum frá føroysku vinnuni er stórur. Eisini á flestu útflutningsmarknaðunum gongur væl. Útflutningshagtølini tala fyri seg.

Arbeiðsloysið liggur omanfyri 2%, og talið á løntakarum nærkast nú aftur 26.000, sum er nærum ájavnt við løntakaratalið í 2008.

Hetta er gott, men tað er framvegis ein avbjóðing at fáa fatur á røttu arbeiðsmegini, ikki bara til handverksvinnuna, men eisini til aðrar partar av vinnuni.

Tilsamans vóru lønargjaldingarnar í 2016, góðar 210 mió. kr. hægri enn í 2015. Verður bert hugt eftir lønargjaldingunum frá vinnuni í 2016 í mun til 2015 sæst, at lønargjaldingarnar eru vaksnar við 173 mió. kr., meðan almennu lønarútgjaldingarnar eru vaksnar við 40 mió. kr.

Verður hugt nærri eftir tølunum sæst, at tað er fiskiveiða og alivinnan, sum hevur størsta vøksturin, men eisini innan byggivinnu og tænastuvinnu er vøkstur.

Higartil í 2017 vísa hagtølini, at vøksturin í lønargjaldingum ikki er líka stórur, sum í sama tíðarskeiði undanfarnu tvey árini. Framgongdin higartil í ár er 4,3%, samanborið við góð 7% um árið seinastu tvey árini.

Tann parturin av fiskivinnuni, sum fiskar undir Føroyum, hevur enn stórar avbjóðingar. Fiskiskapurin er framvegis sera vánaligur, tó at veiðan eftir teimum mest vanligu botnfiskasløgunum er kvinkað nakað uppeftir í 2016 í mun til 2015. Feskfiskaveiðan var í 2016 góð 75.000 tons, sum er eini 4.000 tons meira enn í 2015. Framvegis er tað serliga innan botnfiskasløgini tosk og hýsu, at standurin er ringur. Hóast nøgdin av toski hækkaði nakað í 2016, er veiðan framvegis lítil. Nøgdin av hýsu var at kalla óbroytt. Nøgdin av upsa øktist við góðum 1.500 tonsum, men er tó framvegis munandi lægri enn fyri fáum árum síðani, hóast stovnurin skal eitast at vera hampiliga væl fyri.

Havstovan sigur í tilráðingunum, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri, meðan støðan í hýsu- og toskastovnunum er sera ring. Tilgongdin av toski og hýsu er framvegis vánalig, og eingi útlit eru til bata í fiskiskapinum komandi árið.

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum, íroknað aldan laks, var í 2016 umleið 7,7 mia. kr. í mun til umleið 6,7 mia. kr. í 2015. Serliga er tað útflutningsvirðið á alilaksi, sum er vaksið í 2016 í mun til 2015, meðan útflutningsvirðið á veiddum fiski at kalla hevur staðið í stað.

Alivinnan hevur havt góðar marknaðartreytir seinastu árini. Útlitini fyri 2016 vóru góð, og samlaða tøkan var 70.000 tons í kruvdari vekt. Um hugt verður eftir útflutningsvirðinum frá alivinnuni, er vøksturin frá 2015 til 2016 sera stórur, úr 2,8 mia. kr. til 3,7 mia. kr.

Útflutninginum frá alivinnuni nú er út við 50% av samlaða føroyska útflutninginum og er laksur størsta einstaka útflutningsvøran.

Sum heild gongur tað eisini væl lívfrøðiliga í alivinnuni. ILA var staðfest í einum alibrúki herfyri og framvegis eru tað sera stórar avbjóðingar við at niðurberja laksalús. Alivinnan samstarvar um at tálma og loysa hesa stóru avbjóðing, og verða stór átøk gjørd fyri at koma trupulleikanum til lívs.

Byggivinnan er komin fyri seg aftur eftir truplu tíðina, sum byrjaði í 2009. Lønargjaldingarnar í 2016 í mun til 2015 er vaksnar við umleið 30 mió. kr., sum er heldur lakari enn vøksturin frá 2014 til 2015. Byggivinnuni tørvar tó framvegis arbeiðsmegi, og Føroya Arbeiðsgevarafelag óttast fyri, at lønarglíðing fer fram orsakað av hesum.

Gleðiligt er at síggja, at eisini innan aðrar vinnugreinar so sum ferðavinnu, handilsvinnu, tænastuvinnu veksur virksemið, og at lønargjaldingarnar í hesum vinnugreinum eisini vaksa. Veitingarvinnan til oljuvinnuna hevur tó stórar avbjóðingar orsaka av lága oljuprísinum, og útlit eru ikki til stórvegis broytingar hesum viðvíkjandi komandi árið.

## Fiskivinnunýskipan, eftirlønarnýskipan og ynski um ein yvirskipaðan vinnupolitikk.

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag er at taka ábyrgd av teimum yvirskipaðu arbeiðsmarknaðar- og vinnupolitisku kørmunum, sum vinnan arbeiðir undir.

Fleiri nýskipanir hava verið á politisku dagsskránni seinasta ári, men nýskipan av almenna partinum av búskapinum er tó ikki til at fáa eyga á. Leingi lovaða eftirlønarnýskipanin er framvegis ikki komin, og einki miðvíst verður gjørt við at fáa tamarhald á almennu útreiðslunum, soleiðis at betri samsvar er millum inntøkur frá skatti og avgjøldum og útreiðslurnar hjá almenna kassanum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um marknaðaratgongd, skattapolitikk og arbeiðsmarknaðarpolitikk til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag valt at seta ljósið á hesi trý mál: fiskivinnunýskipan, eftirlønarnýskipan og vinnupolitikk.

## Støða Føroya Arbeiðsgevarafelags er:

- Tørvur er á at gera eina fiskivinnunýskipan, men hetta má gerast við støði í einum yvirskipaðum vinnupolitikki. Pørtum av uppskotinum til nýggja fiskivinnuskipan kann felagið taka undir við. Harímillum ætlanunum um burðardyggan fiskiskap, grundað á umsitingarætlanir, herda revsing fyri ólógligan fiskiskap og kvotaskipan. Tó tekur Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki undir við uppboðssølu av rættindum, tí mett verður ikki, at slík skipan í longdini gevur størsta avkastið hvørki fyri fyritøkurnar í vinnuni ella fyri landið. Felagið mælir til eina fíggjarliga burðardygga skatting av tilfeingisrentuni, grundað á staðfest miðalúrslit í vinnuni. Somuleiðis skal vinnan hava frælsi at leggja viðurskiftini til rættis, tó við ávísum rímiligum avmarkingum, har atlit verða tikin til samfelagsvirðini.
- Eftirlønarnýskipan hevur verið á skránni í mong ár. Eisini henda samgonga hevur sett sær fyri at fáa í lag hesa nýskipan. Tað vísir seg tó, at trupult er at fáa politiska semju um hetta stóra mál. Føroya Arbeiðsgevarafelag saknar, at politiska skipanin gevur sær far um stóru ábyrgdina, sum partarnar á arbeiðsmarknaðinum hava tikið í kollektivum sáttmálum, og ansar eftir at politiska nýskipanin tekur atlit til kollektivu avtalurnar, sum eru gjørdar. Tað er somuleiðis neyðugt, at partarnar á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við í arbeiðið at nýskipa eftirlønarøkið.
- Neyðugt er at dagføra landsins vinnupolitik. Føroya Arbeiðsgevarafelag mælir til, at hetta verður gjørt sum skjótast. Seinastu út við tvey árini hevur verið arbeitt við fiskivinnu-, ferðavinnu-, sjóvinnu- og alipolitikki, og nú er eisini orkupolitikkur á dagsskránni. Gott og neyðugt er, at arbeitt verður við vinnugreinapolitikki, men Føroya Arbeiðsgevarafelag saknar at vinnupolitikkurin verður dagførdur, og kann verða grundarlag undir teimum vinnugreinapolitikkum, sum verða gjørdir.

## Sáttmálasamráðingar

Sáttmálasamráðingar við fakfeløgini er týdningarmiklasta uppgávan hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag. Samráðingarrundan 2016 – 2018 er nú komin væl áleiðis, tí bert tríggir sáttmálar eru eftir at fáa í lag. Nýggj samráðingarrunda fyri 2018-2020 byrjar 1. mai 2018.

Samráðingarnar við arbeiðarafeløgini endaðu 6. mai 2016, tá semja um nýggjar tveyára sáttmálar varð undirskrivað. Úrslitið var ein útreiðslukarmur á 2,2% fyrra árið og 2,3% seinna árið. Semjan við arbeiðarafeløgini legði støðið undir øllum samráðingunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag samráðingarrunduna 2016 – 2018. Hetta hevur eisini verið útreiðslukarmurin higartil í hesi samráðingarrunduni.

18. mai 2017

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Bergur Poulsen, formaður

# INNIHALDSYVIRLIT


**FRÁGREIÐING FRÁ NEVNDINI ........ 2**

**INNGANGUR ........ 7**

**HVAT ER NÚ AT GERA? TILMÆLI FRÁ FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG ........ 8**

Fiskivinnunýskipan við skili ........ 8
Komið nú á mál við pensjónsnýskipanini ........ 10
Neyðugt við yvirskipaðum vinnupolitikki ........ 11

**MÁL Í 2016 OG 2017 ........ 13**

**SÁTTMÁLASAMRÁÐINGAR 2016- 2017 ........ 15**

*Samráðingarrundan 2016 – 2018 ........ 15*
*Samráðingar við arbeiðarafeløgini ........ 15*
*Samráðingar við YTF um Elektron ........ 15*
*Samráðingar við Atlantic Workers Union ........ 15*
*Samráðingar við Føroya Hand-verkarafelag og Landsfelag Handverkaranna ........ 15*
*Samráðingar við Starvsmanna-felagið um flogternur ........ 15*
*Samráðingar við Starvsmanna-felagið um Føroya Tele og Posta ........ 15*
*Samráðingar við manningarfeløgini ........ 16*
*Samráðingar við S & K ........ 16*
*Samráðingar við Grafiska Yrkis-felagið ........ 16*
*Samráðingar við Finansforbundet og YTF ........ 16*
*Komandi sáttmálasamráðingar ........ 16*

**TILTØK 2016 ........ 17**

**GONGDIN INNAN YMISKU VINNUGREINARNAR ........ 20**

Fiskivinna og fiskatilvirking ........ 20
*Útflutningurin ........ 20*
*Rávørutilgongdin ........ 21*
*Búskaparliga gongdin í fiskatilvirking ........ 21*
Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu ........ 22
Havbúnaður ........ 23
*Framleiðsla ........ 23*
*Lívfrøðiligir váðar ........ 24*
*Skattur og avgjøld ........ 24*
*Søla og marknaðarútlit ........ 25*
Handverksvinnan ........ 26
*Gongdin í byggivinnuni ........ 26*
*Innflutningurin av byggitilfari ........ 26*
*Talið á nýbyggingum ........ 26*
*Útlit fyri handverksvinnuna ........ 27*
Shippingvinnan ........ 28
Oljuvinnan ........ 28
KT-vinnan ........ 29
Samskiftisvinnan ........ 29
Ráðgevaravinnan ........ 30
Handilsvinnan ........ 30
Ferðavinnan ........ 32
Ídnaðarvinnan ........ 34

**UM FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG, VINNUHÚSIÐ OG FELØGINI ANNARS ........ 36**

**HVØR HÚSAST Í VINNUHÚSINUM? ........ 37**

**NEVNDIN Í FØROYA ARBEIÐSGEVARAFELAG ........ 38**

# Inngangur

Føroya Arbeiðsgevarafelag umboðar flestu arbeiðsgevarar í landinum, og er virksemið hjá okkara limum sum heild grundarlagið undir samfelagnum.

Sum ein týdningarmikil spælari í føroyska samfelagnum átekur Føroya Arbeiðsgevarafelag sær leiklutin sum viðmerkjari og viðspælari í mun til, hvussu samfelagið Føroyar eigur at vera skipað.

Sjónarmið Føroya Arbeiðsgevarafelags verða á hvørjum ári staðfest í ársfrágreiðingini og annars so hvørt á heimasíðu felagsins www.industry.fo.

Í ársfrágreiðingunum undanfarin ár og í frágreiðingum frá felagnum annars eru eisini sjónarmið felagsins um allar tættir, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur hava týdning fyri føroysku vinnuna og samfelagið.

Hetta ger Føroya Arbeiðsgevarafelag ásannandi, at góðir karmar fyri vinnu og eitt burðardygt vinnulív eru nær tengd at gongdini í samfelagnum.

Í undanfarnum ársfrágreiðingum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag, hevur felagið m.a. tikið spurningarnar um marknaðaratgongd, skattapolitikk og arbeiðsmarknaðarpolitikk til viðgerðar.

Í hesi ársfrágreiðingini fyri 2016, nýtir Føroya Arbeiðsgevarafelag høvi at koma við sínum sjónarmiðum um, hvørji viðurskifti tað eisini er tørvur á at vísa ans komandi tíðina. Hetta verður gjørt fyri at skapa kjak um loysnir fyri føroyska samfelagið, soleiðis at vit fáa eitt gott og sterkt grundarlag undir tí búskaparvøkstri, sum vit nú hava.

Tað eru óivað onnur viðurskifti, sum høvdu verið týdningarmikil at tikið upp, men Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur í ár valt at seta sjóneykuna á hesi:

- Fiskivinnunýskipan við skili
- Komið nú á mál við eftirlønarnýskipanini
- Neyðug við yvirskipaðum vinnupolitikki

## *Fiskivinnunýskipan við skili*

### Nýskipanin má taka støði í vinnupolitikki

Í hesum døgum er endaliga uppskotið um nýskipan av fiskivinnuni á veg í Løgtingið. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at fiskivinnan hevur tørv á einari nýskipan. Tó er tað sera umráðandi, at okkara fólkavaldu politikarar gera tær røttu broytingarnar í okkara fiskivinnuskipan, so vit broyta lýtini við verandi skipan, meðan vit varðveita tað, sum riggar væl. Endamálið við einari og hvørjari nýskipan av fiskivinnuni má vera at fáa sum mest burturúr tilfeinginum. Broytingarnar mugu tí taka støði í vinnupolitikki, ikki sosialpolitikki. Lógarkarmarnir mugu geva fiskivinnuni frælsi og eggja til at skapa so stórt virði sum gjørligt fyri samfelagið. Skattapolitikkurin kann nýtast til at býta hesa virðisskapanina javnari millum borgarar í hesum landi, men fiskivinnupolitikkurin má fyrst og fremst tryggja, at virðini yvirhøvur verða skapt.

### FAG tekur undir við stórum pørtum av lógaruppskotinum...

Við hesum útgangsstøði tekur FAG undir við fleiri pørtum av tí lógaruppskotinum, sum landsstýrið sendi til ummælis. Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur fult undir við, at fiskiskapurin verður skipaður meira burðardygt við umsitingarætlanum, eginkvotum og herdum revsireglum fyri ólógligan fiskiskap. Hesar reglur kunnu einsamallar skapa eitt stórt meirvirði fyri føroyska samfelagið, og hetta er tí skilagóður vinnupolitikkur.

### ... men er ivasamt um aðrar partar

Hinvegin heldur FAG grundleggjandi, at tað er nógv, sum riggar væl við verandi fiskivinnuskipan, og tørvur er tí ikki á at kollvelta alla skipanina, men heldur at gera nakrar meira avmarkaðar, væl valdar broytingar. Seinastu 30 árini er fiskivinnan broytt frá at fáa hundraðtals milliónir í árligum stuðli til at gjalda væl av pengum til landskassan, so okkurt er gjørt rætt.

Útlutingin av fiskiloyvum skal skapa røttu tileggjanina til effektivitet.

Eitt av teimum viðurskiftum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag er ivasamt um, er hátturin, sum ætlanin er at nýta til at útluta veiðurættindi. Tað er neyðugt, at útlutingarhátturin gevur teimum, sum sleppa at umsita fólksins ogn, røttu tileggjanina til at skapa so stórt virði burturúr hesum rættindum sum gjørligt. Fyri at fiskivinnan kann geva so stóra virðisskapan sum gjørligt, er tað avgerandi, at (1) rættindini eru so mikið trygg, at eigararnir hava útlit til eitt rímiligt avkast av stórum og váðafúsum íløgum, og (2) at rættindini eru umsetilig, so at nýggir, meira effektivir aktørar kunnu taka yvir, tá løtan er lagalig.

At bjóða fiskiveiðurættindi út við jøvnum millumbilum heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag ikki vera rætti hátturin at útluta rættindi. Orsøkin til hetta er einføld. Fyri at fáa sum mest burturúr er tað sera umráðandi, at rættindahavarar hava ein langan tíðarhorisont. Fyrst og fremst soleiðis at tað er gjørligt at gera váðafúsar íløgur, sum kasta av sær yvir tíð. Tað kann t.d. vera at gera royndir við nýggjum veiðu- og goymsluháttum, at brúka pening uppá at upparbeiða eitt serligt brand fyri fiskavørurnar, ella at upparbeiða nýggjar marknaðir fyri fiskavørurnar.

Um ein uppboðssøla verður skipað, er stórur vandi fyri, at tíðarhorisonturin hjá teimum, sum vinna sær rættindi á uppboðssøluni, verða stuttskygd. Tað fer at snúgva seg um at fáa nakað burturúr tilfeinginum, meðan tú hevur tað, og í minni mun um at gera váðafúsar íløgur, sum kunnu kasta av sær uppá longri sikt. Tá slíkar íløgur byrja at kasta av sær, kanst tú hava mist rættindini, og tann, sum tá fær ágóðan av gjørdu íløgunum, rindar einki fyri virðið av gjørdu íløgunum.

Sostatt er FAG ikki, sum onkur hevur ført fram í fjølmiðlunum, ímóti kapping. Kappingin verður tryggjað við umsetiligheitini í nýtslurættindunum, samstundis sum ein skipan við tryggum nýtslurættindum gevur røttu tileggjanina til at gera váðafúsar íløgur.

Harumframt fer ein uppboðssøluskipan sannlíkt at føra til, at ikki bert yvirnormalur vinningur, men eisini vanligi vinningurin verður útholaður uppá sikt. Hetta serliga orsakað av, at tey mest optimistisku boðini fara at vinna á uppboðssøluni, og hesi fara í fleiri førum at liggja omanfyri virði av fiskirættindum, sum verða staðfest seinni. Ikki tí reiðarar ikki duga at meta, men tí eingin við vissu veit, hvussu prísur og veiðunøgdir fara at vera í framtíðini. Nøkur hava eina meira optimistiska

meting, og summi eina meira pessimistiska. Reella virði liggur so sannlíkt onkrastaðni í miðjuni. Av tí at tað eru tey mest optimistisku, sum vinna uppboðssøluna, kann hetta føra til, at pengar ikki verða til at fremja neyðugu íløgurnar komandi árini.

Fyrivarni má takast fyri, at vit ikki kenna endaliga innihaldið í tí lógaruppskotinum, sum er borið Løgtinginum, og sjónarmiðið er tí grundað á tað lógaruppskotið, sum varð sent til ummælis.

## Atgongd til fiskivinnuna fyri nýggjar aktørar

Eitt av høvuðssjónarmiðunum fyri fiskivinnunýskipanina er, at atgongdin fyri nýggjar aktørar má vera lættari. Í verandi skipan kunnu nýggir aktørar keypa seg inn í fiskivinnuna, men atgongdin verður sjálvsagt truplari í vinnum, har tað í løtuni gongur væl, tí virðið á fiskiloyvunum er tá meira vert. Tað verður tó nógv lættari at keypa seg inn í vinnuna, um landið skattar ein rímiligan part av tilfeingisrentuni. Tá verða loyvini ikki líka nógv verd, og tað verður lættari at fíggja keyp og sølu av loyvum.

Her má landið hugsað fíggjarliga burðardygt, soleiðis at búskaparliga íkastið verður so stórt sum gjørligt. Ikki bert tað einstaka árið, men yvir eitt longri tíðarskeið. Eitt fíggjarligt burðardygt tilfeingisgjald gevur tað størsta avkastið til landið og harvið størsta møguliga tilfeingisgjaldið yvir tíð.

## Anti-trust reglur

Keyp og søla av fiskirættindum hevur viðført, at tað í ávísum fiskiskapum er vorðin ein størri miðsavnan av aktørum, enn tað var fyri nøkrum árum síðani, og at talið av fiskiførum er minkað. Hetta hevur í stóran mun verið viðvirkandi til, at í øllum førum partar av fiskivinnuni hava megnað at ment seg og vent einum undirskoti til eitt yvirskot.

Við fyriliggjandi uppskoti skjýtur landsstýrið upp, at vit skulu fara frá hesari partvíst vælvirkandi skipan og aftur til eina skipan, har vit tvinga ov nógv stál, ov nógva fiskiorku inn í skipanina aftur. Eitt av høvuðsendamálunum við lógaruppskotinum tykist vera at fáa fleiri aktørar inn í skipanina, og harvið verða tað fleiri at býta verandi tilfeingi. Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at um anti-trust mørkini vera sett ov lágt, er tað at løggeva ineffektivitet inn í skipanina.

Hóast FAG er samt í, at okkurt mark má vera fyri, hvussu stóran part av vinnuni ein aktørur kann eiga, mugu politisku myndugleikarnir vera sera varnir við at seta hesi mørk ov lágt, tí avleiðingin av hesum kann vera, at man ikki fær mest effektivu fiskivinnunýskipanina.

## Frælsi at leggja virksemið til rættis

Ein grundleggjandi fortreyt fyri at fáa sum mest burturúr tilfeinginum er grundreglan um, at fiskivinnufyritøkur mugu fáa frælsi at leggja virksemið til rættis, tó við ávísum rímiligum avmarkingum, har atlit verða tikin til samfelagsvirði. Í uppskotinum eru fleiri ásetingar, sum avmarka møguleikarnar at skipa virksemið, so sum fyritøkurnar meta tað verða mest skynsamt at gera. Í álitinum hjá nýskipanarnevndini varð dentur eisini lagdur á, at tað búskaparliga er skilagott, at fyritøkur hava møguleika at skipa seg við vertikalari integratión.

## Eitt alternativt uppskot til fiskivinnunýskipan

Fyri at røkka yvirskipaða endamálinum um eina fiskivinnunýskipan, sum kastar sum mest av sær til samfelagið, mælir FAG til, at ein fiskivinnunýskipan tekur støði í verandi skipan. Ein fiskivinnunýskipan eigur at verða grundað á hesi høvuðsprinsipp:

- Burðardyggan fiskiskap, grundað á umsitingarætlanir
- Herda revsing fyri ólógligan fiskiskap
- Trygg nýtslurættindi
- Kvotaskipan við innbygdari umsetiligheit í skipanini
- Serskatting av vinningi við víðarisølu av loyvum og rættindum
- Eina burðardygga skatting av tilfeingisrentuni, grundað á staðfest miðalúrslit í vinnuni
- Tryggja at skattur av vinningi, sum kemur úr føroyskum tilfeingi, verður goldin í Føroyum
- Frælsi at leggja viðurskiftini til rættis, tó við ávísum rímiligum avmarkingum, har atlit verða tikin til samfelagsvirði

Ein slík nýskipan hevði veruliga verið til fyrimuns fyri landið alt, tað almenna, virkiseigarar og starvsfólk.

FAG heldur, at verandi uppskot hevur ov nógvar váðar, tí eingin kennir fullu avleiðingarnar av so víðfevndum broytingum, gjørdar í einum. Mælt verður í staðin til at endurskoða verandi skipan fyri at gera tiltrongdar broytingar eftir teimum

høvuðsprinsippum, sum eru nevnd omanfyri. Vit eiga síðan at eftirmeta virknaðin av framdu broytingunum, áðrenn vit gera aðrar broytingar. Harvið fáa vit framt neyðugu broytingarnar í fiskivinnuni við eini tilgongd, sum hóskar til stóra váðan av at gera broytingar í eini av okkara høvuðsvinnum.

## Komið nú á mál við pensjónsnýskipanini

Í samgonguskjalinum hjá sitandi samgongu verður sagt, at

*"Arbeiðið í pensjónsbólkinum heldur fram. Pensjónsnýskipanin skal vera búskaparliga haldfør og lutvíst samhaldsføst, og hon skal tryggja, at peningarenslið í størri mun er í føroyska samfelagnum. Meginreglan er, at øll í Føroyum hava rætt til jøvn og virðilig kor á ellisárum. Skipanin skal eggja fólki at arbeiða eftir pensjónsaldur, um tey hava hug og møguleika til tess. Harumframt skal pensjónsnýskipanin leggja upp fyri, at vit gerast fleiri eldri, og hon skal rætta avleiðingarnar av, at farið varð undir at forskatta pensjónirnar. Uppskot um pensjónsnýskipan verður lagt fyri Løgtingið í seinasta lagi á heysti 2016."*

Nú nærkast heystið 2017, og onki uppskot um pensjónsnýskipan er lagt fram. Tó betri er, at arbeiðið er liðugt, og breið politisk semja er, áðrenn nakað verður lagt fram, heldur enn at smávegis broytingar verða framdar, soleiðis sum gjørt hevur verið higartil.

Føroya Arbeiðsgevarafelag metir tað vera av stórum týdningi, at tann nýskipan, sum liggur í kortinum, verður framd, men at tað hevur eins stóran týdning, at tað í hesum arbeiðnum verða tikin atlit til øll viðurskifti, sum verða ávirkað av nýskipanini.

Á økinum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og á arbeiðsmarknaðinum annars eigur serliga at verða tikin hædd fyri teimum skipanum, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum longu hava sett í verk. Eftirlønaruppsparing í kollektivu sáttmálunum á privata arbeiðsmarknaðinum byrjaði longu í 80-unum, og øll fakfeløg á privata arbeiðsmarknaðinum hava nú ásett eitt eftirlønargjald á millum 10% og 18%, alt eftir sáttmála. Hetta er ein væl virkandi skipan, sum er úrslit av, at arbeiðsmarknaðurin tók á seg ábyrgdina, langt áðrenn politiska skipanin gjørdi tað. Politiska skipanin eigur at virða hetta og taka hædd fyri tí, tá lógarbroytingar verða gjørdar.

Tað, sum higartil er gjørt á eftirlønarøkinum, hevur tíverri ikki tikið hædd fyri, at skipanin í kollektivu sáttmálunum longu var í gildi, áðrenn eftirlønarlógin varð sett í gildi. Hetta hevur skapt ávísar trupulleikar og skeivleikar, soleiðis at arbeiðsgevarar í onkrum førum hava verið noyddir til at bróta sáttmálaásetingar fyri yvirhøvur at fáa flutt lønina.

Tá Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur gjørt vart við hetta, hava vit verið út fyri at verið møtt við, at so mugu sáttmálarnir tillagast. Kollektivu sáttmálarnir eru tilevnaðir yvir fleiri áratíggju í samráðingum millum arbeiðsmarknaðarpartarnar. Á privata arbeiðsmarknaðinum er talan um knappar 40 sáttmálar, og talið á almenna arbeiðsmarknaðinum er nakað tað sama. "Bara" at tillaga kollektivu sáttmálarnar er tí ikki ein realistiskur møguleiki.

Tað eigur at vera tað allarminsta, at hædd verður tikin fyri verandi skipanum, tá nýggjar verða gjørdar. Serliga tá hesar hava júst sama grundleggjandi endamál, sum eftirlønarlógin skal hava.

Afturat hesum sær tað eisini út til, at politiska skipanina hevur lætt við at flyta útreiðslur frá almenna kassanum út á bæði arbeiðsgevarar og løntakarar, m.a. við tí broyting í fólkapensjónunum og arbeiðsmarknaðareftirlønargjaldinum, sum varð skundað ígjøgnum í december 2015.

Tá pensjónsbólkurin hjá landsstýrinum arbeiðir við framtíðar broytingum á pensjónsøkinum er neyðugt at minnast til, at tað ikki einans eru tríggjar soylur, soleiðis sum onkrum politikarum dámar at taka til. Umframt fólkapensjón, arbeiðsmarknaðar-eftirlønargrunnin og eftirløn sambært eftirlønarlógini er sanniliga ein fjórða soyla, sum eitur eftirlønaruppsparing sambært kollektivu sáttmálunum á arbeiðsmarknaðinum.

Vónandi minnist politiska skipanin til hesa fjórðu vælvirkandi soyluna, og at hetta verður partur av arbeiðnum við pensjónsnýskipanini.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at landsstýrið má fara heilt grundleggjandi til verka, og vit heita staðiliga á landsstýrið at minnast til at taka arbeiðsmarknaðin við uppá ráð, soleiðis at tann pensjónsnýskipan, sum einaferð kemur, eisini

tekur atlit til allar tættir innan hetta økið, og at hon verður endalig, so vit ikki framhaldandi skulu síggja smávegis broytingar og tillagingar gjørdar á økinum.

### Mælt verður til

- at landsstýrið fær gongd á arbeiðið við pensjónsnýskipanini
- at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir við í arbeiðið
- at pensjónsnýskipanin hesuferð fevnir um allar tættir og verður endalig við breiðari politiskari semju

## *Neyðugt við yvirskipaðum vinnupolitikki*

Fiskivinnunýskipan, alipolitikkur, ferðavinnupolitikkur og sjóvinnupolitikkur hevur verið á skránni seinasta árið ella so. Nú er gongd eisini sett á orkupolitikk.

Føroya Arbeiðsgevarafelag fegnast um, at arbeitt verður við at gera vinnupolitikk fyri útvaldar vinnugreinir, men kundi harumframt hugsað sær, at gongd varð sett á eitt arbeiði at gera ein yvirskipaðan vinnupolitikk við breiðum politiskum uppbakningi. Felagið væntar tó, at hetta verður sett á dagsskrá.

Føroya Arbeiðsgevarafelag ynskir ein yvirskipaðan vinnupolitikk, sum vinnugreinapolitikkir kunnu taka støði í. Somuleiðis kunnu landsfyrisiting og stovnar undir landinum brúka politikkin sum grundarlag undir øllum teimum avgerðum, sum annars verða tiknar, og sum ávirka vinnuna. Ein yvirskipaður vinnupolitikkur verður eisini vegleiðandi, tá ymisk átøk verða umhugsað.

Vinnupolitisk rit eru skrivaði í fleiri umførum síðan krepputíðina í 90'unum, seinast í 2005 í sambandi við visjón 2015, men Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur, at tíðin nú er komin til, at yvirskipaði vinnupolitikkurin verður dagførdur, so politiska skipanin fær vinnupolitikkin inn undir húðina aftur. Føroya Arbeiðsgevarafelag luttekur fegið í hesum arbeiði. Eftir fíggjar- og búskaparkreppuna, sum var í 90'unum, settu arbeiðsgevarafeløgini og fakfeløgini saman við Menningarstovuni skjøtul á arbeiðið at fáa ein greiðan vinnupolitikk. Hetta varð gjørt ásannandi, at eitt sunt og burðardygt vinnulív er grundarlagið undir einum sunnum búskapi. Nú er tíð uppá, at tey, sum hava áhuga í at menna føroyskt vinnulív, seta út í kortið, so fortreytirnar eru greiðar, og tað ber til at leggja ætlanir. Hetta kundi verið ein leistur fyri endurskoðan av landsins vinnupolitikki.

### Endurskoða vinnupolitikkin

Tað er eingin orsøk at byrja heilt av nýggjum. Grundarlagið er gjørt í áður nevndu ritum, og tískil er talan um at endurskoða og dagføra vinnupolitikkin.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur tað sjónarmið, at tað hevur alstóran týdning, at yvirskipaða vinnulóggávan er einføld og so vítt gjørligt eins fyri allar vinnugreinar. Hetta fyri at tryggja gjøgnumskygni og stimbra hugin hjá teimum virkisfúsu. Somuleiðis skal hetta tryggja, at vinnulívið hevur fokus á at fáa fyritøkurnar at ganga so væl sum gjørligt, í staðin fyri at fokusera uppá lóggávu og at ganga ørindi til politisku skipanina. Endamálið kann bert náast gjøgnum ein greiðan vinnupolitik.

Hvørt aðalráð og hvør kommuna tekur avgerðir og ger lógir og kunngerðir, sum hava týdning fyri vinnulívið. Tað hevði uttan iva verið ein fyrimunur, um allir almennir myndugleikar høvdu ein greiðan vinnupolitikk at halda seg til, tá avgerðir verða tiknar og átøk verða gjørd, sum eru viðkomandi fyri vinnulívið.

Ein greiður vinnupolitikkur, sum er frískur í huganum hjá landsstýrisfólki, hevði kunnað verið við til at fyribyrgt, at einstakir landsstýrismenn ella løgtingslimir koma við ítøkiligum ætlanum ella uppskotum, sum eru í stríð við ein yvirskipaðan politikk.

Herfyri boðaði landsstýrismaðurin í Samferðslumálum frá, at eitt tunnislið skuldi setast á stovn á Landsverki fyri at fáa gjørt tunlar til smærru bygdirnar í Føroyum. Hetta er í stríð við ein áralangan politikk um, at størri verkætlanir vera bjóðaðar út fyri at fáa verkætlanina framda so skjótt og kostnaðareffektivt sum gjørligt.

Vikuna eftir boðskapin um tunnilslið frá landsstýrismanninum í samferðslumálum boðar

landsstýriskvinnan í fíggjarmálum frá, at í fíggjarkørmunum fyri komandi ár leggur Landsstýrið dent á at útveita tað, sum útveitast kann, og at landsstýrið í einum og øllum leggur dent á at skapa virksemi og ikki at byggja upp almenna sektorin.

Í einum slíkum føri hevði tað verið betri, um avgerðirnar tóku støði í einum yvirskipaðum vinnupolitikki, so vinstra og høgra hond vóru betur samskipaðar.

Annað dømið, sum nevnast kann, er politisku útmeldingarnar um útlendskan kapital í føroyskari vinnu. Uttan at taka dagar ímillum, í hvønn mun útlendskur kapitalur skal kunnu luttaka í føroyskum vinnulívi, so undrar tað Føroya Arbeiðsgevarafelag, at tað almenna á heimasíðuni Invest in the Faroes dyrgir eftir útlendskum kapitali til eitt nú fiskivinnuna, samstundis sum landsstýri er í ferð við at forða fyri útlendskum kapitali í uppskotinum um nýggja fiskivinnunýskipan.

## Mælt verður til

- at endurskoða og dagføra yvirskipaða vinnupolitikin
- at allir vinnugreinapolitikkir hava støði í yvirskipaða vinnupolitikkinum

## Mál í 2016 og 2017

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verða nevnd yvirskipað mál frá farna ári, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið partur av, og sum eru umráðandi fyri vinnuna.

Umframt tey mál, sum eru nevnd niðanfyri, geva Føroya Arbeiðsgevarafelag og hini feløgini í Vinnuhúsinum hoyringssvar í sambandi við nýggjar lógir, kunngerðir, vegleiðingar v.m., sum koma frá politisku skipanini. Til ber at lesa øll hesi hoyringssvar á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo.

Javnan verður skipað fyri kunningartiltøkum um evni, sum eru viðkomandi fyri limir okkara. Hetta verður gjørt við sokallaðum heimleiðistiltøkum, sum verða fyriskipað seinnapartar nakrar ferðir um árið.

- Í juni 2016 kom lógaruppskot um endurstovnan av Landsbanka Føroya og Føroya Váðaráð til hoyringar. Landsbankin varð síðani endurstovnaður tann 1 januar í ár. Í sama viðfangi varð Samhaldsfasti arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin fluttur aftur til Landsbankan at umsita.
- Broytingar í skattalógini hava eisini verið til hoyringar. Hetta sjálvt um ein arbeiðsbólkur varð settur í 2016, sum hevur til uppgávu at hyggja uppá og koma við tilmælum um nýggja skattaskipan.
- Uppskot um eigarapolitik landsins og landspartafeløg hevur verið til hoyringar. Uppskotini snúðu seg í stóran mun um at seta í verk umfatandi eftirlit og herða krøv til partafeløg, sum landið eigur meirilutan í. Politikkurin er ikki settur í verk enn, men verður hann tað, krevur tað munandi upphæddir í játtan á fíggjarlógini til hetta eftirlit.
- Umfatandi lóggáva er galdandi fyri sjóvinnuna. Henda verður javnan dagførd og soleiðis eisini undanfarna ár. Talan er m.a. um lóg um trygd á sjónum, sjómannalógin, tonsaskattalógina, kunngerðir undir sjólógini, kunngerð um at vátta vekt av pakkaðum bingjum og kunngerð um barlastarvatn. Harafturat hevur verið arbeitt við einum álitið um sjóvinnupolitik, sum fyri stutt síðan varð handað landsstýrismanninum.
- Vinnufelagalóggávan er dagførd seinasta árið. Dagføringin var ein liður í regluligu dagføringini, sum er gjørd av hesum økinum nú í mong ár.
- Á arbeiðsmarknaðarøkinum er broyting gjørd í kunngerð um umsiting av barsilsskipan, og lóg um heilsutrygd er tillagað, soleiðis at fólk, sum arbeiða í øðrum norðurlandi, kunnu søkja um undantak frá gjaldsskyldu. Ikki færri enn fýra ferðir eru broytingar gjørdar í dagpeningalógini. Hetta varð m.a. gjørt í sambandi við, at lóg um sjúkratrygd til fiskimenn varð avtikin og løgd inn í dagpeningalógina. Broytingarnar í dagpeningalógini løgdu seg í stóran mun upp at ásetingunum, sum vóru í sjúkratrygdarlógini og merkja, at krøvini til, hvør kann fáa dagpengar, verða linkað. Við aðrari lógarbroyting er ætlanin at víðka tryggingarskipanina undir dagpeningalógini. Í tveimum umførum hevur uppskot verið um at avtaka ella linka um kravið um læknaváttan til tess at fáa dagpening. Tíbetur hevur hetta verið tikið úr aftur uppskotunum, áðrenn tey vórðu borin á Ting. Føroya Arbeiðsgevarafelag er ímóti at linka krøvini.
- Í samband við fjórða útbjóðingarumfar til leiting og framleiðslu av olju undir Føroyum hevur kolvetnislóggávan verið til hoyringar.
- Eisini lógaruppskot um heimild hjá Bústøðum at útvega fígging til bústaðarbygging hevur verið til hoyringar.
- Talgilding Føroya hevur fingið drúgva umrøðu seinasta árið, og lóggáva hevur verið til hoyringar, sum leggja karmar um fígging og innihald.
- Fiskivinnunýskipanin hevur fingið sera drúgva umrøðu hetta seinasta árið. Nýskipanarnevnd hevur gjørt tilmælið til fiskimálaráðharran um nýggja skipan. Seinast í mars mánaða varð lógaruppskot sent til hoyringar. Sera umfatandi og drúgvar hoyrings-viðmerkingar eru sendar frá øllum áhugapørtum. Føroya Arbeiðsgevara-

felag hevur gjørt yvirskipaðar viðmerkingar til lógaruppskotið og hevur latið vinnugreinafeløgini í fiskivinnuni um ítøkiligar viðmerkingar. Politiskt var ikki semju um lógaruppskotið, sum varð sent til hoyringar, og broytingar eru gjørdar í uppskotinum, sum júst er lagt fyri Tingið.

- Eisini innan fíggjarøkið hevur lóggáva verið til hoyringar. Fyri tað mesta er hetta dagføringar, soleiðis at føroyska relguverkið líkist ES regluverkinum. Herfyri hevur eisini umfatandi broyting í vinnufyritøkulógini verið í uppskotið. Uppskotið snúði seg um at avmarkað virkismøguleikarnar hjá Betri samtakinum.

- Pensjónsnýskipan hevur eisini verið á dagsskrá. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur verið á einum kunnandi fundi við landsstýriskvinnurnar í Almannamálum og í Fíggjarmálum, annars hevur einans verið arbeitt politiskt við hesum málinum, og partarnar á arbeiðs-marknaðinum eru ikki bodnir at luttaka. Ætlanin var, at uppskot skuldi leggjast fram í hesi tingsetuni, men enn er politisk semja ikki fingin í lag.

- Nýskipan av regluverkinum kring alivinnuna hevur eisini verið á politisku dagsskránni. Ætlanin var at leggja lógaruppskot um broytingar í alilógini fram í hesi tingsetuni, men tað er ikki gjørt.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur á vári í 2017 gjørt eina kanning av lokalu umstøðunum at reka vinnu um landið. Úrslitini frá kanningini vórðu í apríl-mai 2017 løgd fram fyri kommununum og fjølmiðlafólki og fyri limum í arbeiðsgevarafelagnum.

- Ein heildarætlan fyri ferðavinnuna í Føroyum er almannakunngjørd fyri stutt síðan. Heildarætlanin tekur støði í burðadyggari ferðavinnu og hevur til endamáls at menna innanlands ferðavinnuna. Ferðavinnufelagið hevur havt eitt umboð í arbeiðsbólkinum, sum hevur orðað ætlanina. Nú er tað upp til samgonguna at fáa neyðugu játtanina til vega, soleiðis at heildarætlanin kann fremjast í verki.

- Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur várið 2017 gjørt eina kanning av umstøðunum at reka vinnu í Føroyum. Kanningin verður gjørd eftir einum lesti, har tað ber til at samanbera úrslitini við onnur lond, og verður kanningin løgd fram á Vinnudegnum, sum í ár verður fríggjadagin 15. september.

# Sáttmálasamráðingar 2016– 2017

Føroya Arbeiðsgevarafelag við undirfeløgum tess varðar av øllum sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt sáttmálunum fyri handilsskip.

Størsta sáttmálaøkið eru sáttmálarnir við tey fimm arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Havnar Arbeiðskvinnufelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag. Samráðingarnar við hesi feløg eru tær fyrstu í hvørjari nýggjari samráðingarrundu, og leggja hesar støðið undir øllum sáttmálunum í runduni.

## Samráðingarrundan 2016 – 2018

## Samráðingar við arbeiðarafeløgini

Samráðingarrundan 2016 – 2018 byrjaði, tá Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini skrivaðu undir sáttmála hin 6. mai 2016.

Undir sáttmálasamráðingunum í 2014 ynsktu handverkarafeløgini at samráðast um karmin saman við arbeiðarafeløgunum. Hetta góðtóku Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag treytað av, at tey samráddust sum ein partur, soleiðis at tey høvdu felags støðutakan til møguliga semju

Arbeiðarafeløgini og handverkarafeløgini skuldu áðrenn 1. januar 2016 boða Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag frá, hvørt tey vóru samd um ein nýggjan samráðingarleist. Hetta bar tíverri ikki á mál, og tí verður karmurin framhaldandi lagdur í samráðingunum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og tey fimm arbeiðarafeløgini.

Við semjuni, sum varð undirskrivað 6. mai 2016, var hækkingin í sáttmálunum avtalað við einum karmi á 2,2% fyrra árið og 2,3% seinna árið.

Hesar hækkingar verða sostatt tær, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag og limafeløg tess fara at halda seg til í hesi samráðingarrunduni.

## Samráðingar við YTF um Elektron

Mikudagin 15. juni 2016 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF undir nýggjan eittára sáttmála fyri Elektron. Semja varð um eina lønarhækking á 2,25% umframt aðrar tillagingar í sáttmálanum.

Orsøkin til hesa hækking er, at eisini í 2015 varð ein eittára sáttmáli gjørdur. Lønarhækkingin hesuferð er sostatt seinna árið í samráðingarrunduni 2014-2016.

## Samráðingar við Atlantic Workers Union

Føroya Arbeiðsgevarafelag saman við Føroya Handverksmeistarafelag og Føroya Handverkarafelag saman við Atlantic Workers Union skrivaðu undir semju um nýggjan sáttmála hin 13. oktober 2016. Lønin hækkaði hin 1. oktober 2016 við1,34% og eftirlønin við 1,07% til 12%. Hin 1. oktober 2017 hækkar lønin við 2,3%.

Atlantic Workers Union er fakfelag hjá flogmekanikarum hjá Atlantic Airways.

## Samráðingar við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Handverksmeistarafelag skrivaðu hin 7. november 2016 undir semju um nýggjan sáttmála við Føroya Handverkarafelag og Landsfelag Handverkaranna. Sáttmálin er galdandi frá 1. oktober 2016 til 30. september 2018.

Semjan hevði við sær eina lønarhækking á 2,2% 1. oktober í 2016 og 2,3% 1. oktober 2017, umframt aðrar tillagingar í sáttmálanum.

## Samráðingar við Starvsmannafelagið um flogternur

Hin 8. november 2016 undirskrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið nýggjan 2-ára sáttmála fyri flogternur hjá Atlantic Airways.

Við semjuni hækkar lønin við 0,8% 1. november 2016 og við 2,0% 1. november 2017. Harafturat vóru aðrar broytingar gjørdar, soleiðis at samlaðu hækkingarnar vórðu ávikavist 2,2% og 2,3%.

Flogternur hava higartil verið skipaðar í fakfelagnum Súlan. Súlan hevur tó meldað seg inn í Starvsmannafelagið, og Starvsmannafelagið hevur soleiðis yvirtikið sáttmálan fyri flogternur.

## Samráðingar við Starvsmannafelagið um Føroya Tele og Posta

Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið skrivaðu hin 13. december 2016 undir nýggjar sáttmálar fyri Posta og Føroya Tele galdandi fyri tíðarskeiðið 1. januar 2017 til 1. januar 2019.

Partarnir vórðu samdir um eina lønarhækking á 2,2% hin 1. januar 2017 og 2,3% hin 1. januar 2018.

## Samráðingar við manningarfeløgini

Tey trý manningarfeløgini, Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Maskinmeistarafelagið og Føroya Fiskimannafelag samráddust hesuferð hvør sær. Tað er Reiðarafelagið fyri Farmaskip sum limur í FAG, sum samráðist við manningarfeløgini. Fyri øll feløgini er talan um ein yvirskipaðan sáttmála og tveir sersáttmálar fyri frálandaskip.

Fyrsta semjan varð gjørd við Maskinmeistarafelagið hin 20. februar 2017. Við semjuni vórðu sáttmálarnir longdir til 1. mars 2019 við ávísum broytingum. Saman við eftirlønarhækkingini, sum 1. mars 2017 hækkar við 1% til 9% og aftur 1. mars 2018 við 1% til 10%, er hækkingin ávikavist 2,2% 1. mars 2017 og 2,3% 1. mars 2018.

Hin 10. mars samdust Føroya Fiskimannafelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip um nýggjan tveyára sáttmála. Eftirløn og løn hækkaðu við somu procentum, sum avtalað varð við Maskinmeistarafelagið.

Nakrar dagar seinni, hin 13. mars, undirskrivaðu Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Reiðarafelagið fyri Farmaskip undir semju. Eisini her er talan um tveyára sáttmála við somu hækkingum sum í hinum báðum sáttmálunum við manningarfeløgini.

## Samráðingar við S & K

Fríggjadagin hin 21. apríl 2017 skrivaðu Føroya Arbeiðsgevarafelag og S&K undir nýggjan tveyára sáttmála.

Partarnir vórðu samdir um eina lønarhækking á 2% hin 1. mai 2017 og 2% hin 1. mai 2018. Eftirlønin hækkar við 0,25% hin 1. mai 2017 og 0,38% hin 1. mai 2018. Tilsamans er sostatt talan um eina hækking á ávikavist 2,2% og 2,3%.

## Samráðingar við Grafiska Yrkis-felagið

Hin 27. apríl skrivaðu Føroya Prentsmiðjufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag undir semju um nýggjan tveyára sáttmála við Grafiska Yrkisfelagið og Landsfelag Handverkaranna.

Umframt broytingar í starvsaldursásetingini hevði semjan við sær eina lønarhækking, sum 1. mai 2017 er 2,15% og 1. mai 2018 2,3%.

## Samráðingar við Finansforbundet og YTF

Føroya Arbeiðsgevarafelag og YTF fóru í 2016 undir samráðingar um, at dagføra og leggja saman høvuðsavtalunar fyri peningastovnarar og tryggingarfeløgini. Komið varð á mál við hesum í juni 2016, og í dag er sostatt talan um eina høvuðsavtalu fyri alt sáttmálaøkið hjá YTF.

Í apríl gjørdu Føroya Arbeiðsgevarafelag og Finansforbundet nýggjan tveyára sáttmála. Semja varð um eina lønarhækking á 2,2% 1. árið og 2,3% 2. árið. Harafturat varð gjørd ein avtala um víðkaða arbeiðstíð, umframt aðrar broytingar og tillaðingar í sáttmálnum.

Hin 2. mai skrivaði Føroya Arbeiðsgevarafelag undir nýggjan sáttmála við YTF fyri tryggingar- og peningastovnsøkið. Sáttmálin varð longdur í tvey ár til 1. mai 2019, og eins og fyri Finansforbundet fylgir lønarhækkingin sama karmi, sum onnur hava fingið hesa sáttmálarunduna.

## Komandi sáttmálasamráðingar

Sáttmálarnir, sum eftir eru at samráðast um í hesi samráðingarrunduni, ganga út sum víst niðanfyri.

| | |
|---|---|
| 1. juni 2017 | Sáttmálin við YTF um Elektron |
| 1. november 2017 | Sáttmálin við Føroysk Miðlafólk. |
| 1. apríl 2018 | Sáttmálin við Flogskiparafelag Føroya |
| **1. mai 2018** | **Sáttmálarnir við arbeiðarafeløgini ganga út.<br>Nýggj samráðingarrunda byrjar.** |

# Tiltøk 2016

## Kunning og átøk

Á heysti 2016 fyrireikaði felagið saman við í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum vinnuferð til Kina. Landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og vinnumálum stóð á odda fyri vinnuferðini, sum var sera væleydnað.

Um ársskiftið hevði Vinnuhúsið ein bás á Jobmatch 2016. Hetta er afturvendandi tiltak, sum Vinnuhúsið hevur verði við til at fyriskipa, fyri at geva høvi til lesandi í Føroyum og uttanlands at koma í samband við føroyskt vinnulív.

Annaðhvørt ár ger Føroya Arbeiðsgevarafelag bóklingin "Vegleiðing um setanarviðurskifti" til limir sínar. Triðja útgáva av bóklinginum varð soleiðis send limunum í december 2016.

Í sambandi við at tað í 2016 vóru 100 ár liðin, síðani fyrsti kollektivi sáttmálin varð undirskrivaður, hevði Føroya Arbeiðsgevarafelag saman við arbeiðarafeløgunum eitt ynski um at fáa gjørt undirvísingartilfar um arbeiðsmarknaðin. Heitt varð á Nám um at taka sær av hesum, og undirvísingartilfar til miðnám er nú skrivað, og arbeitt verður við at fáa tilfarið snikkað til sum talgilt undirvísingartilfar.

## Heimleiðis tiltøk í Vinnuhúsinum

Føroya Arbeiðsgevarafelag og feløgini í Vinnuhúsinum skipað javnan fyri heimleiðistiltøkum, sum eru styttri tiltøk um viðkomandi evnir.

Í juni mánað var skipað fyri heimleiðistiltakið, har umboð frá Nopef greiddu frá teirra virksemi og teimum møguleikum, sum Nopef bjóðar føroyskum fyritøkum. Eisini var ráðgevi frá Eik við og tosaði um bankafígging.

Nopef er norðurlendskur grunnur, ið kann veita stuðul til fyritøkur, sum hava ætlanir at stovna sølu- og/ella framleiðslueind í londum uttanfyri ES.

Eitt heimleiðistiltak var eisini í november, har Helgi Rasmussen, sálarfrøðingur og rithøvundur, hevði eitt upplegg um bókina "Finn teg í organisjónini"

Í februarmánaða var limatiltak fyri sjálvstøðug vinnurekandi, har framløgur vóru um arbeiðsloysisstuðul, barsilspening og sjúkradagpening. Hetta var serliga ætlað sjálvstøðugum vinnurekandi, eigarum og stjórum í privatum fyritøkum.

Í sambandi við at Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur kannað, hvussu lokalu umstøðurnar at reka vinnu í Føroyum eru, vóru allar kommunur í landinum bjóðaðar til framløgu av kanningini. Eisini var heimleiðistiltak fyri limur í Føroya Arbeiðsgevarafelag, har limirnir vóru kunnaðir um úrslitini av kanningini.

## Vinnudagurin 2016

Hetta var 17. ferð, at skipað varð fyri Vinnudegnum. Tað er framvegis týdningarmikið at halda fast við henda eina dagin um árið, har føroysk vinna kann vera saman um hetta, sum onkur hevur kallað hátíðardagur vinnunar. Luttøkan var góð, og dagurin væleydnaður.

Veitslan á Vinnudegnum 2016 var øðrvísi skipað í mun til undanfarin ár. Sermerktu hølini hjá Østrøm vóru karmur um hátíðarhaldið, har borðreitt varð við alskyns mati á ymsum básum, ið stóðu úti og inni. Gott høvi var tí hjá gestunum at heilsa uppá hvønn annan í einum óformligum umhvørvi. Samanumtikið varð nýggi hátturin at skipa veitsluna sera væl eydnaður.

Á Vinnudegnum vóru sum vanligt Ársins Virki og Ársins Átak kosin.

**Dómsnevndin valdi KJ-Hydraulik til Ársins Virki 2016. Grundgevingin hjá dómsnevndini var hendan:**

"Føroyar eru eitt samfelag, sum er umgirt av vatni. Bæði tí vit liggja mitt í Norðuratlantshavi, og ikki minst tí vit stóran part av tíðini verða undiroyst í regni úr erva. Bora vit niður í undirgrundina, so spríkir mín sann eisini vatn uppeftir, og í summum førum enntá heitt vatn. So vatn og veskur eru frá náttúrunnar hond ein stórur partur av okkara tilverugrundarlagi. Og vit royna sum frægast at gagnnýta teir møguleikar, tað gevur. Fiskiskip, farmaskip og havbúnaðurin brúka havið til at skapa stór virði fyri føroyska samfelagið hvønn einasta dag. Regnvatn úr fjøllunum savnast í áum og verður haðani leitt gjøgnum slangur og tappað niður í fløskur, sum verða seldar her heima og uttanlands. Á orkuøkinum hava vit megnað at tamt ein part av vatnorkuni við at leiða vatnið gjøgnum rør oman til turbinustøðir, og harvið framleiða streym til føroysk húsarhald og vinnulív. Jú, nógvir møguleikar eru í vatni og veskum.

Eisini á øðrum økjum hava vatn og veskur ein týðandi leiklut í vinnuvirkseminum, hóast vit vanliga ikki geva okkum far um tað. Heilt afturi í 6. øld fyri Krist nýttu bøndur í Mesopotamia og Egyptalandi hesa tøkni til at leiða vatn úr áum til tess at væta markirnar, sum lógu longri burturi. Tøknin er síðani ment, og hevur breitt seg út um allan heimin. Hon verður í dag brúkt í nógvari ymiskari aðrari tøkni, eisini her í Føroyum.

Tá vit síggja ein trukk á keiini, geva vit okkum vanliga ikki far um, at tað er sama tøkni, sum eru orsøk til, at trukkurin klárar at lyfta tunga fiskakassan. Og tá vit síggja eitt skip, eina tvíkilju ella ein bát venda inn í havnina, geva vit okkum vanliga ikki far um, at tað aftur er henda tøknin, sum ger, at ein skipari kann standa á brúnni ella í stýrihúsinum og fáa róðrið at venda við miklari kraft.

Dómsnevndin hevur í grundgevingini fyri at velja júst hesa fyritøkuna til Ársins Virki lagt dent á, at fyritøkan hevur verið framfýsin og víst ein vilja til vøkstur bæði heima í Føroyum og uttanfyri landoddarnar. Dómsnevndin hevur eisini lagt dent á, at fyritøkan seinastu árini hevur haft støðug fíggjarlig úrslit, og at tey sum heild eru vorðin betri ár fyri ár. Eginpenings- og ognaravkast eru millum tey frægastu í landinum. Fyritøkan leggur stóran dent á støðuga og góða góðsku, og hevur til hetta endamál sett í verk góðskustýringarskipanir.

Ársins Virki 2016 varð sett á stovn í 1978. Fyritøkan er grundað á serkunnleika innan hydraulik og maskintøkni og veitir útgerð saman við tænastum til fiskiídnaðin, alivinnuna, umframt flutningsvinnuna og byggivinnuna. Fyritøkan framleiðir m.a. aliringar og tvíkiljur, ið verða seldar til kundar í Føroyum og uttanlands. Eisini selur fyritøkan eina røð av maskinum og eykalutum, og veitir tænastur til hesi. Umleið ein triðingur av inntøkunum stavar frá alivinnuni, ein triðingur frá fiskivinnuni og ein triðingur frá tí almenna og entreprenørum.

Sum ein av størru fyritøkunum á maskintekniska økinum í Føroyum, veitir Ársins Virki eisini útgerð og tænastur til útlendskar marknaðir, eitt nú til Íslands, Skotlands, Hetlands, Grønlands, Danmarkar og til Noregs.

Fyritøkan hevur víðkað um sítt virkisøki, og deildir eru settar á stovn í Tórshavn og Danmark. Í løtuni starvast uml. 100 starvsfólk í fyritøkuni, nógv tey flestu í Føroyum. Talið á starvsfólki er støðugt økt seinastu árini.

Á Vinnudegnum í fjør segði ein av fyrilestrarhaldarum: "Gloym Silicon Valley, hugsa Kambsdal!". Tey orðini hevur dómsnevndin tikið til sín og valt eina fyritøku við høvuðssetri í júst tí vinnuliga kraftsentrinum á Kambsdali.

Hóast tey flestu helst longu hava gitt, hvørja fyritøku talan er um, skal tað tó sigast hart. Ofta verður sagt, at hevur man sagt A, má man eisini siga B. Í hesum føri kann man í staðin fara eitt sindur longri fram í alfabetið: hevur man sagt K, má man eisini siga J.

Ársins Virki 2016 er KJ Hydraulik, og vilja vit fegin bjóða Ólavi Asafssyni Olsen, stjóra í KJ, niður at taka ímóti heiðrinum."

**Ársins Átak 2016 var Sheep View. Í grundgeving síni segði dómsnevndin m.a.:**

"Er tað eitt, sum eyðkennir okkum í Føroyum, so er tað, at okkum dámar væl at vitja og at fáa vitjan. Vit vitja familju og kenningar, vit ganga í barnaføðingardagar hjá dóttir systkinabarn trímenningin, vit støkka inn á gólvið, vit heilsa uppá, og so framvegis. Og um tað onkuntíð ikki liggur fyri hjá okkum at koma, kunnu vit í øllum førum geva eitt like ella skriva okkurt á Facebook-vangan hjá teimum, sum eitt plástur upp á sárið.

Tá tað nú eru so nógv at vitja, at tað er torført hjá fólki at náa alt, má man royna at gera nakað serligt fyri at fáa fólk at vitja seg, so man ikki bara fær Facebook likes. Men tað er ikki altíð so lætt, tí onnur royna eisini at lokka tey at koma til sín at vitja. So tað er skilligt, at summi velja at leggja myndasøvn út á Facebook av sínum barnaføðingardegi, so vit øll kunnu minnast í felag, júst hvussu hugnaligt tað var. Og tað virkar, tí fólk eru sum seyðir: okkum dámar best at gera tað, sum øllum øðrum eisini dáma.

Tá tað snýr seg um at fáa sannført útlendsk ferðafólk um at koma til Føroyar at uppliva landið at halda feriu, er avbjóðingin uppaftur størri hjá føroysku ferðavinnuni. Tí øll onnur lond royna eisini at sannføra ferðafólkini um, at júst teirra land ella býur er tann besti fyri tey og teirra familju at vitja. Og hóast vit øll halda at Føroyar er tað vakrasta og mest sermerkta landið í heiminum, er tað ikki nóg mikið. Vit mugu eisini fáa onnur at trúgva upp á tað, ella í minsta lagi forvitnast so mikið nógv, at tey velja at keypa ein ferðaseðil henda vegin. Tað snýr seg um at skapa nakrar myndir inni í høvdinum á ferðafólkunum av, hvussu fantastiskt tað er í Føroyum. Og tá meina vit ikki við Facebookmyndir av hasum

grønakakufótbóltsvøllinum frá 8 ára føðingardegnum hjá systursoninum, tí slíkar myndir eru neyvan nóg lokkandi at fáa tey at keypa ein flogferðaseðil at koma henda vegin.

Nei, í nútíðar ferðavinnu vilja fólk vita, hvussu landið sær út, áðrenn tey koma. Og ikki bara tað - tey vilja hava møguleika at vita, hvussu tað sær út í gøtuni uttanfyri húsið, sum tey ætla sær at leiga, ella tey vilja kunna fara út á vegin frá hotellinum at ganga ein túr í grannalagnum. Tey vilja síggja út á Trøllkonufingur, og tey vilja kunna standa uppi á Slættaratindi og hyggja norðureftir. Og alt hetta skal vera gjørligt, áðrenn tey koma. Trupulleikin hevur verið, at tað hevur ikki verið møguligt í Føroyum. Fyrr enn nú.

Tí hvat er at gera, tá tað forritið, sum flestu ferðafólk brúka, ikki vil koma til Føroya at taka myndir av okkara praktfullu oyggjum? Tá man ikki hevur eina fíggjarætlan ella eina støðd, sum beinanvegin ger okkum áhugaverd fyri stórar fyritøkur? Jú, tá er neyðugt at hugsa eitt sindur út úr mjørkanum og brúka síni kreativu evni.

Tað verður sagt, at idioti er at gera tað sama umaftur og umaftur og vænta eitt øðrvísi úrslit. Tí er tað forfrískandi, tá onkur velur eina heilt aðra tilgongd til tann óloysta trupulleikan.

Ársins Átak er ein slík kreativ loysn uppá ein ítøkiligan trupulleika, og samstundis er tað genial marknaðarføring av Føroyum sum ferðamál. Tá man gjøgnumførir eitt hugskot við at seta myndatól á seyð, so hann tekur myndir av oyggjunum og støðunum, har hann gongur, tekur man ein kjans, tí man veit ikki, um ella hvussu umheimurin fer at taka ímóti hesum. Men átakið hevur tikið miðlar í øllum heiminum við storm við uml. 2 mia. eksponeringum. Tá má sjálvt ein tann virðismiklasta fyritøkan í heiminum geva seg yvir, og Google valdi at senda starvsfólk og útgerð til Føroya at gera Google Street View.

Harafturat vildi Google eisini co-branda átakið og sær eitt virðið í at siga søguna á sínum egnu miðlum, og Google brúkar í dag átakið í síni marknaðarføring.

Ársins Átak 2016 er Sheep View átakið, sum Visit Faroe Islands hevur staðið fyri í samstarvi við Atlantic Airways, og sum hevur vakt ans um allan heim. Virðið á hesari umtaluni er torført at gera upp í pengum. Tó verður mett, at PR-virðið er omanfyri trý hundrað milliónir krónur, meðan kostnaðurin hevur verið ein brøkpartur av hesum. Hetta er eitt átak í orðsins sanna týdningi, og vit vilja við hesum bjóða Guðrið Højgaard, stjóra á Visit Faroe Islands niður her at taka ímóti heiðrinum fyri Ársins Átak 2016."

## Gongdin innan ymisku vinnugreinarnar

### *Fiskivinna og fiskatilvirking*

#### Útflutningurin

Samlaða útflutningsvirðið á øllum fiskavørum íroknað aldan laks var í 2016 knappar 7,7 mia. kr. í mun til umleið 6,7 mia. kr. í 2015. Tað er økta útflutningsvirðið á aldum laksi, sum er høvuðsorsøk til økingina, meðan ein lítil øking hevur verið í útflutningsvirðinum á fiskavørum úr veiddum fiski. Samlaða útflutta tonsatalið av fiskavørum øktist við knappum 47 tús. tonsum frá 2015 til 2016.

#### Botnfiskur

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum úr vanligu botnfiskasløgunum upsa, toski og hýsu minkaði við uml. 70 mió. kr. tilsamans í 2016 í mun til árið fyri. Útflutningsvirðið á svartkalva stóð í stað. Av botnfiskasløgunum er tað framvegis toskurin, sum hevur størsta útflutningsvirðið við tilsamans 690 mió. kr. Fiskavørur úr upsa høvdu tilsamans eitt virði á 319 mió. kr., meðan virðið á svartkalvanum var 167 mió. kr. Útflutningsvirðið á hýsu er tilsamans 100 mió. kr., og verður meginparturin av hýsuni eisini útfluttur sum heilur fiskur. Flundrufiskur hevði eitt útflutningsvirði á 206 mió. kr., harav svartkalvin átti 167 mió. kr.

Um hugt verður eftir útflutninginum frá flakavinnuni sæst, at útflutningsvirðið á toskaflaki var nærum óbroytt, meðan útflutningsvirðið á saltaðum toskavørum minkaði umleið 35 mió. kr. Útflutningsvirðið av upsaflaki minkaði umleið 25 mió. kr., meðan útflutningurin úr hýsuflaki minkaði eitt vet. Tað er vert at hava í huga, at væl av botnfiski verður innflutt heilt, síðani virkað og útflutt aftur. Undir brotinum niðanfyri um rávørutilgongd sæst, at eisini rávørutilgongdin av hesum fiskasløgum øktist eitt sindur í mun til árið fyri.




Kelda: Hagstova Føroya

## Rávørutilgongdin

### Botnfiskur

Talvan niðanfyri vísir, at samlaða nøgdin í føroysku feskfiskaveiðuni øktist nakað aftur í 2016. Hóast árliga feskfiskaveiðan framvegis kann samanberast við veiðuna í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum, var talan um annað árið á rað við vøkstri í bæði nøgd og avreiðingarvirði. Tó má havast í huga, at partur av veiðini hevur sín uppruna uttanfyri føroyskt sjóøki.

Serliga tá tað snýr seg um botnfiskasløgini tosk og hýsu, er framvegis ringur standur. Toskur og hýsa eru sum heild stak illa fyri, og fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum er bert ein viðfáningur av, hvat hann var fyri nøkrum árum síðani. Nøgdin av hýsu var í 2003 knøpp 25.000 tons, meðan hon seinnu árini hevur verið um 3-4.000 tons.

Nøgdin av upsa øktist við góðum 1.500 tonsum, men er tó framvegis munandi lægri enn fyri fáum árum síðani. Havstovan metir, at upsin er hampuliga væl fyri. Nøgdin á flatfiski øktist, meðan nøgdin av øðrum fiskasløgum minkaði nakað. Avreiðingartølini higartil í ár geva ikki ábending um nakran bata fyri feskfiskaveiðina.

Samlaða avreiðingarvirðið av feskfiskaveiðuni var umleið 866 mió. kr. í 2016 í mun til 816 mió. í 2015, so her er talan um eina øking. Miðal avreiðingarprísurin var sum heild eitt vet hægri í 2016 í mun til 2015, tó at munur er á fiskasløgunum.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2015** | **2016** | **2015** | **2016** | **2015** | **2016** |
| **Toskur** | 12.052 | 12.922 | 207.772 | 236.719 | 17,24 | 18,32 |
| **Hýsa** | 3.626 | 3.996 | 57.091 | 56.689 | 15,74 | 14,19 |
| **Upsi** | 23.232 | 24.814 | 222.080 | 197.665 | 9,56 | 7,97 |
| **Annar botnfiskur** | 9.430 | 9.562 | 99.772 | 93.055 | 10,58 | 9,73 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.531 | 6.339 | 141.435 | 195.436 | 31,21 | 30,83 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 14.989 | 14.327 | 77.108 | 76.270 | 5,14 | 5,32 |
| **Skeljadjór** | 3.000 | 3.016 | 9.998 | 9.665 | 3,33 | 3,20 |
| **Rogn, livur v.m.** | 173 | 78 | 692 | 312 | 4,00 | 4,00 |
| **Veiðan tilsamans** | **71.032** | **75.053** | **815.949** | **865.812** | **11,49** | **11,54** |

Kelda: www.hagstova.fo

### Búskaparliga gongdin í fiskatilvirking

Sum tað sæst í brotinum omanfyri, vóru nøgdirnar í føroysku feskfiskaveiðini í 2016 á sama støði sum í ringastu kreppuárunum fyrst í 90'unum, hóast ein lítlan bata. Tó at partar av flakavinnuni, í eini roynd at bøta um sera avmarkaðu rávørunøgdirnar, hava innflutt frystan fisk úr útlandinum til virkingar, er hetta ein fíggjarliga dýrari loysn. Umframt svikaliga rávørutilgongd er marknaðaratgongdin til aðrar botnfiskamarknaðir eisini verri enn hjá okkara kappingarneytum. Samanumtikið er tí eingin ivi um, at viðurskiftini hjá flakavinnuni framvegis eru sera avbjóðandi.

Hjá uppisjóvarvirkjunum er støðan betri, og øktu nøgdirnar hava verið viðvirkandi til at stuðla upp undir rentabilitetin í vinnuni. Ymiskt er tó, hvussu støðuga rávørutilgongd virkini hava. Uppisjóvarvirkini eru enn nýggj, og tað hevur tekur tíð at fáa framleiðsluna at virka eftir ætlan og at uppbyggja sambandið við best gjaldandi keypararnar á marknaðinum. Orsakað av vantandi avtalu við Kina hevur tað ikki verið gjørligt at útflyta frystan makrel til Kina. Ultimo 2016 varð tó protokoll undirskrivað um treytirnar fyri útflutning av frystum makreli til Kina, og tað hevur latið upp ein áhugaverdan framtíðarmarknað fyri føroyskan makrel. Tó er eftir at fáa ein fríhandilsavtalu í lag við Kina, so føroyska uppisjóvarvinnan fær javnbjóðis treytir í mun til kappingarneytarnar í eitt nú Íslandi.

# Útlitini fyri fiskiveiðu og framleiðslu

## Útlit fyri fiskiskapin

### Botnfiskur

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum fyri fiskiárið 2016/2017 skrivar Havstovan, at upsastovnurin er hampiliga væl fyri og í vøkstri, meðan bæði hýsu- og toskastovnurin er illa fyri. Nakað av hýsu er á veg inn í gýtingarstovnin, men eingi útlit eru til bata fyri toskin. Vit eru í longsta tíðarskeiði við fiskaloysi, ið hagtøl eru tøk fyri (síðani fyrst í 1900-talinum fyri Landgrunnin og 1965 fyri Føroyabanka). Havstovan mælir til at seta álvarslig tiltøk í verk.

Um toskin á landgrunninum skrivar Havstovan, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2004. Stovnurin í 2015 verður mettur at vera umleið 19.700 tons, sum er undir minsta markinum fyri, hvat er ráðiligt. Langtíðarmálið er, at stovnurin í minsta lagi skal vera 40.000 tons. Tilgongdin av 2 ára gomlum toski hevur líka síðani 2001 verið undir miðal, og í 2011-2015 er hon mett at vera sera lítil. Sostatt er eingin ivi um, at toskastovnurin á landgrunninum framvegis er illa fyri og hevur alla verju fyri neyðini.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka framvegis er illa fyri, og mælir Havstovan framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini heilt illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er lívfrøðiliga ráðiligt. Ábendingar eru um, at 2015 árgangurin er góður, og umráðandi er, at hesin árgangur fær umstøður at seta til gýtingarstovnin.

Upsagýtingarstovnurin er hampuliga væl fyri, og er framvegis nakað omanfyri minstamarkið fyri, hvat er ráðiligt. Veiðutrýstið hevur verið í hægra lagi, men hevur seinastu tvey árini ligið nær langtíðarmálinum.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapin eftir vanligu botnfiskasløgunum eru lítið hugalig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðinøgdin av botnfiski undir Føroyum verður á sama lága støði, sum hon hevur verið árini frammanundan. Tó eru glottar at hóma viðvíkjandi upsanum og hýsuni.

## Uppisjóvarfiskur

ICES hevur í sínum tilmæli fyri 2017 mælt til, at samlaða mest loyvda veiða fyri norðhavssild ikki verður hægri enn 646 tús. tons fyri øll strandalondini. Hetta er ein hækking á 104% í mun til árið fyri. Tó skrivar ICES eisini, at stovnurin er í minking. Eingin avtala er millum strandalondini um sildina, og Føroyar hava ásett sær eina kvotu á 126.000 tons. Fyribils eru á 10.000 tons útlutaði.

Fyri makrelin mælir ICES til, at samlaða mest loyvda veiða verður 857 tús tons. Hetta er ein hækking á umleið 11% í mun til 2016. Tó hava strandalondini ásett eina heildarkvotu, sum er hægri enn hetta. Noreg, ES og Føroyar hava gjørt eina sínamillum avtalu um fiskiskapin eftir makreli. Føroyska heildarkvotan er 129 tús. tons, harav føroysk skip kunnu fiska 96 tús. tons umframt írestandi kvotu frá 2016.

Fyri svartkjaftin hevur ICES mælt til, at samlaða mest loyvda veiða fyri svartkjaftin ikki verður hægri enn 1.342 tons. Hetta er ein øking á 73% í mun til 2016. Føroyska heildarkvotan er 486 tús. tons, íroknað kvotu frá ES. 97 tús. tons verða latin øðrum londum sambært fiskiveiðuavtalum, og eftir til føroysk skip at fiska eru sostatt 389 tús. tons. Fyribils eru 265 tús. tons útlutaði til føroysk skip at fiska.

Sum heild kann sigast, at hóast tilmælini frá ICES eru hækkaði, hava strandalondini ásett kvotur, sum viðføra, at veiðitrýstið er omanfyri tilmælini hjá ICES.

## Marknaðurin

### Botnfiskur

Útflytarar av botnfiskavørum hava í stóran mun dúvað uppá siðbundna ES-marknaðin. Soleiðis eisini í 2016, har heili 92% av føroyska botnfiskinum fór til ES. Hetta er ein øking í mun til 2015, tá umleið 83% av virðinum av botnfiskinum fór til ES. Flatfiskurin fer í størri mun til marknaðir uttanfyri ES, hóast ES-marknaðurin eisini her er álitið. Í 2016 fór 62% av flatfiskinum til ES.

Støðan á marknaðinum kann broytast skjótt, og t.d. eru dømi um, at tá keypiorkan svíkur í londum uttanfyri Europa, eru fiskaseljarar skjótir at skifta til aðrar marknaðir, og tað kann skjótt viðføra, at kappingin harðnar á

evropeiska marknaðinum. Tí hevur tað serliga stóran týdning, at aðrir marknaðir eru opnir fyri føroyskum fiskavørum. Góð marknaðaratgongd er ein fortreyt, um vit vilja tryggja, at vit fáa besta prís og mest virði fyri útflutta fiskin, og harvið eisini tryggja arbeiðspláss í Føroyum.

Hóast serstøðu í løtuni á ávísum marknaðum, hava føroysku fiskaútflytarar framvegis munandi verri marknaðaratgongd uttanfyri ES enn okkara størstu kappingarneytar. Harumframt vita vit, at tann serstøða, sum Føroyar hava havt á eitt nú russiska marknaðinum ikki fer at vara við. Betrað marknaðaratgongd til mest áhugaverdu marknaðirnar uttanfyri Evropa er eitt mál, sum má raðfestast frammaliga av føroyskum myndugleikum í komandi árum. Í løtuni eru fleiri marknaðir stongdir fyri føroyskar fiskavørur, tí eingin heilsufrøðilig avtala er við landið.

## Uppisjóvarfiskur

Útflutningurin av uppisjóvarfiski hevur verið eyðkendur av stórum broytingum og sveiggjum, serliga í mun til útflutningsmarknaðirnar. Í 2007 fór niðanfyri 20% av útflutningsvirðinum av mest vanligu uppisjóvarfiskasløgunum til ES-marknaðin. Hetta øktist til umleið til umleið 50% í 2012, men er nú minkað aftur.

Føroyskur uppisjóvarfiskur er í løtuni í einari serstøðu á russiska marknaðinum, og er útflutningurin til Russlands øktur. Hinvegin er marknaðaratgongdin til Nigeria vorðin verri, m.a. orsakað av valutaavmarkingum. Slíkar broytingar eru ein viðvirkandi orsøk til broytingarnar á útflutningsmarknaðunum.

Nýggj avtala millum føroyskar og kinesiskar myndugleikar um treytirnar fyri útflutning av frystum makreli kom í gildi seinast í 2016. Hetta merkir, at tað nú eisini ber til at útflyta frystan makrel til kinesiska marknaðin.

## Marknaðaratgongd

Hóast serstøðu í løtuni á ávísum marknaðum hava føroysku fiskaútflytararnir framvegis munandi verri marknaðaratgongd uttanfyri ES enn okkara størstu kappingarneytar. Harumframt vita vit, at tann serstøða, sum Føroyar hava havt á eitt nú russiska marknaðinum, ikki fer at vara við. Betrað marknaðaratgongd til mest áhugaverdu marknaðirnar uttanfyri Evropa er eitt mál, sum má raðfestast frammarlaga av føroyskum myndugleikum í komandi árum. Í løtuni eru fleiri áhugaverdir marknaðir stongdir fyri føroyskum fiskavørum, tí eingin heilsufrøðilig avtala er við landið.

# *Havbúnaður*

## Framleiðsla

Framleiðslan av laksi frá føroyska havbúnaðinum var í fjør uml. 86.000 tons í rundari vekt (góð 70.000 tons í kruvdari vekt). Framleiðslan var uml. 6% hægri enn í 2015. Søluvirðið vaks úr 2,8 mia. kr. í 2015 upp í 3,7 mia. kr. í 2016. Hetta merkir samstundis, at føroyskur havbúnaður stendur fyri umleið helvtini av samlaða føroyska fiskavøruútflutninginum, og laksur er greitt tann størsta einstaka útflutningsvøran úr Føroyum.

Føroyskur havbúnaður marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin sum føroyskur laksur fær á marknaðinum er eisini hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum.

Seinastu árini er alsamt størri partur av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, serliga Russland, USA og Kina. Í 2008 fór uml. 85% av útflutningsvirðinum av aldum laksi til ES, men hesin partur er seinnu árini minkaður so líðandi, og í 2016 fór minni enn 35% av útflutningsvirðinum til ES-lond. Sostatt hevur tað alsamt størri týdning at tryggja góða marknaðaratgongd til marknaðir, eisini uttanfyri Evropa.

Karmarnir kring framleiðsluna eru annars sum heild góðir, og vinnan hevur seinastu árini havt góð úrslit, tá hugt verður at vøkstri, fóðurfaktori, sjúkustøðu og framleiðslukostnaði. Fellið er eisini á einum lágum støði. Saman við skynsamari lívfrøðiligari stýring hevur ein óvanliga høgur

laksaprísur eisini havt við sær, at feløgini hava havt serliga góð fíggjarlig úrslit í 2016. Alivinnan hevur gjørt íløgur í útbygging av smoltstøðunum, nýggjar brunnbátar og tól til ikki-medisinska lúsafyribyrging og -viðgerð. Slíkar íløgur eru viðvirkandi til at minka um lívfrøðiliga váðan og kunnu geva møguleikar fyri at økja um framleiðsluna á ein burðardyggan hátt, við tað at smoltini eru størri, áðrenn tey koma í ringarnar.

Í 2016 vórðu umleið 16 mió. laksasmolt sett út í Føroyum. Hetta er nakað meira enn í 2015, tá umleið 15,9 mió. smolt vórðu sett út.

**Tøka av laksi og sílum (rund vekt) 2003-2016 (1.000 tons)**




| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Síl | 10,22 | 5,092 | 4,493 | 5,482 | 7,648 | 9,000 | 8,800 | 2,382 | 0,000 | 0,000 | 0,960 | 0,000 | 0,000 | 0,000 |
| Laks | 52,53 | 40,99 | 18,96 | 13,08 | 22,31 | 38,85 | 51,50 | 45,41 | 60,49 | 76,80 | 75,85 | 86,48 | 80,62 | 85,82 |

Kelda: Hagstova Føroya

## Lívfrøðiligir váðar

Laksalúsin er framvegis ein trupulleiki fyri føroyska aling, eins og hon er tað í laksaframleiðslu kring allan heimin, og eigur trupulleikin framvegis at verða tikin í størsta álvara. Umframt at framleiða stór smolt eru feløgini eisini farin undir at nýta m.a. rognkelsi, feskvatnsviðgerð, mekaniska avlúsing og avlúsing við hitaviðgerð til at halda lúsatalinum niðri uttan medisinska viðgerð.

Í 2014 vórðu tey fyrstu rognkelsini sett út í føroyskar aliringar, og rognkelsi verða í dag nýtt sum ein fastur liður í átøkunum móti laksalúsini. Royndirnar við rognkelsum hava higartil verið góðar, og eingin ivi er um, at rognkelsini kunnu vera við til at halda lúsatalinum niðri. Tað er framvegis neyðugt at innflyta rognkelsi til Føroya, tí regluverkið kring rognkelsisframleiðslu í Føroyum ikki er komið uppá pláss. Alifeløgini hava hvør í sínum lagi søkt um byggja støðir at framleiða rognkelsi, og feløgini ynskja, at farið verður undir rognkelsisframleiðslu í Føroyum fyri at kunna tryggja eina støðuga tilgongd av rognkelsum. Tað er tó enn ógreitt, nær regluverkið kring rognkelsisframleiðsluna verður liðugt.

Í 2016 komu nýggjar reglur í gildi við tí endamáli at tálma laksalúsini (kunngerð um yvirvøku og tálming av lúsum á alifiski). Nýggja kunngerðin ásetir m.a. krøv um teljingar av laksalús, markvirði, viðgerðir og um avleiðingar av, at lúsateljingar fara upp um markvirðið.

Í juli 2016 elvdu kanningar til illgruna um sjúkuelvandi ILA-virus í laksi á einari alistøð, og støðin varð sett undir hert eftirlit. Hesin illgruni varð staðfestur í mars 2017, og alifyritøkan avgjørdi at taka allan fiskin á alistøðini. Samstundis verður brakkleggingartíðarskeiðið longt.

## Skattur og avgjøld

1. januar 2016 varð ein nýggj skipan fyri loyvisskatt fyri alifyritøkur sett í verk, sum legði eitt tøkugjald á alivinnuna, ið er 4,5% av einum roknaðum søluvirði. Hesin skattur skal gjaldast, sama um nakað yvirskot er í alivinnuni ella ikki. Harumframt gjalda

fyritøkurnar og eigarar tess vanligan partafelagsskatt og kapitalvinningskatt.

Føroysku havbúnaðarfyritøkurnar og eigarar tess rindaðu í 2016 uml. 430 mió kr. í føroyskum partafelagsskatti, kapitalvinningsskatti og loyvisskatti.

Í dag er forðingin fyri vøkstri í heimsframleiðsluni serliga trupulleikarnir við laksalús, og er tað tí serliga laksalúsin, sum heldur prísinum uppi. Tá trupulleikin við laksalúsini verður loystur, og heimsframleiðslan fer at vaksa aftur, fer vinningurin sannlíkt niður aftur á tað støðið, sum hann var, áðrenn trupulleikarnir við laksalúsini tóku seg upp. Tá verður trupult yvirhøvur at hava nakað yvirskot at reinvestera í fyritøkuna, um verandi avgjaldsskipan verður varðveitt.

**Útflutningsvirðið av laksi og sílum 2007-2016 (1000 kr.)**




| | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SÍL | 100.773 | 138.618 | 175.082 | 69.954 | 8.724 | 195 | 2.585 | 273 | 152 | 183 |
| LAKSUR | 492.661 | 824.419 | 1.203.595 | 1.338.081 | 1.618.393 | 1.822.514 | 2.456.409 | 2.950.538 | 2.799.127 | 3.661.07 |

Kelda: Hagstova Føroya

## Søla og marknaðarútlit

Søluvirðið frá føroyskum havbúnaði vaks úr 2,8 mia. kr. í 2015 upp á knappar 3,7 mia. kr. í 2016. Umleið helvtin av samlaða føroyska vøruútflutninginum er aldur laksur. Í talvuni niðanfyri sæst gongdin í útflutninginum av sílum og laksi.

Føroyska alivinnan marknaðarførir føroyskan laks sum eina hágóðsku fiskavøru, og prísurin, sum føroyskur laksur fær á marknaðinum, er í miðal uml. eina evru hægri pr. kg í mun til laksin hjá fremstu kappingarneytunum. Orsøkin er partvíst, at miðalvektin er hægri, og partvíst, at góðskan á føroyskum alilaksi er høgt í metum. Seinastu árini er alsamt størri parturin av føroyska laksinum seldur til marknaðir uttanfyri Evropa, eitt nú Russland, USA og Kina. Í 2006 varð 83% av laksinum útfluttur til ES, í 2011 var hetta tal minkað til 58%, og í 2016 kom 34% av útflutningsvirðinum frá laksi til ES.

Útflutningurin av laksi til Russlands minkaði í 2016 samanborið við árið fyri, meðan útflutningurin til USA, Kina og ES vaks. Tilsamans keypa hesir 4 marknaðir omanfyri 97% av føroyska laksinum.

Globala tøkan av laksi minkaði við uml. 6% í 2016, m.a. orsakað av trupulleikum í alivinnuni í Kili. Tó varð minkingin í nýtsluni bert 4%, orsakað av tilgongd frá frystigoymslum. Minkandi nøgdirnar hava viðført, at laksaprísurin hevur verið sera góður í 2016. Vøksturin í heimsframleiðsluni av laksi verður væntandi lítil í ár (uml. +1-2% í mun til 2016).

Marknaðarútlitini eru tískil góð uppá stutt sikt. Meira ivasamt er tó, hvørja ávirkan høgi laksaprísurin fer at fáa uppá longri sikt, bæði tí aðrar vørur gerast meira kappingarførar, og tí tað verður meira lokkandi at gera íløgur í aling á landi.

Ætlandi verða stórar íløgur gjørdar í alistøðum á landi komandi árini, og fleiri av hesum verða lagdar nær fjarskotnu marknaðunum. Um henda framleiðsla fæst at virka eftir ætlan, kann hetta økja um framleiðsluna í komandi árum.

Laksaprísurin hevur søguliga sæð sveiggjað nógv, og tí kunnu koma tíðarskeið, tá tað kann gerast torført at vinna pening á marknaðinum

## *Handverksvinnan*

## Gongdin í byggivinnuni

### Innflutningurin av byggitilfari

Myndin niðanfyri vísir innflutningin av tilfari og lutum til byggivinnuna síðani 2004. Eftir at innflutningurin av byggitilfari javnaði seg nakað út í 2015, er vøksturin í 2016 aftur rættuliga stórur. Í 2016 varð innflutt fyri 608 mió kr., sum er næstan eins nógv og í 2007.




Kelda: Hagstova Føroya

### Talið á nýbyggingum

Ein fullfíggjað sethúsa- ella bygningsskráseting er ikki til. Verða skrásetingarnar hjá SEV, viðvíkjandi gjøldum fyri (ný)íbindingar í elkervið nýttar sæst, at bústaðarmarknaðurin er í broyting. Talið av nýbygdum sethúsum minkar alsamt, meðan tað sæst ein vøkstur av øðrum eindum, eitt nú íbúðum.




Nýíbindingar í elkervið, skift á sethús og aðrar eindir. Kelda: Hagstova Føroya

Í 2007, tá innfluttningurin av byggitilfari var beint omanfyri núverandi innfluttning, vóru 281 sethús bygd, í mun til tey 90 húsini, sum vóru bygd í 2016. Hinvegin eru fleiri størri byggiverkætlanir ígongd. Tí kann sigast, at tað gongur væl í byggivinnuni í løtuni.

## Útlit fyri handverksvinnuna

Sum heild eru útlitini hjá byggivinnuni fyri 2017 áleið tey somu sum árið undan. Fleiri stórar verkætlanir eru í innleiðandi fasu, so sum Havnaútbyggingin í Tórshavn, Skúlin á Fløtum og Tórshavnar Musikskúli. Eisini arbeiða fleiri kommunur við útstykkingum bæði til privat og vinnu. Tað hevur stóran týdning fyri bæði samfelag og vinnu, at verkætlanir verða tilrættislagdar soleiðis, at vinnan veit, hvat er í væntu, og tí kann fyrireika seg uppá tað, sum kemur.

Føroya Handverksmeistarafelag hevur seinasta árið sett fleiri átøk í verk fyri at økja um lærlingatilgongdina. Flestu av átøkunum eru rættaði móti fólkaskúlanum og ungdómi sum heild, við tí fyri eyga at kunna um starvsmøguleikar sum handverkari og yrkislærd. M.a. eru tveir bóklingar framleiddir til fólkaskúlan. Annar er eitt roknihefti, sum fylgir einari skúlastovu, og vísir hvussu ymiskir handverkarar hava verið við til at bygt hana. Hin bóklingurin skipar skúlavitjanir á byggiplássum. Eisini hevur verið fyriskipað tiltak, har allir 8. floks næmingar í Tórshavn møttust á Reinsarínum at hoyra fleiri ymisk yrkislærd fólk greiða frá um starvsmøguleikar. Harumframt er sett út í kortið at fyriskipa fyrsta FM fyri handverkslærlingar. Tá fara lærlingar í trimum fakum at kappast um at gerast besti lærlingur í sínum fakið. FM fyri handverkslærlingar verður á Torginum í SMS í viku 40 í ár.

Yrkisútbúgvingarskipanin verður endurskoðað. Har eru serliga tvey mál, sum eru Føroya Handverksmeistarafelag heldur verða átrokandi at fáa broytt. Tað fyrsta, at annað skúlaskeið verður deilt í helvt, soleiðis at lærlingarnir eru tvær ferðir 10 vikur í skúla, heldur enn 20 vikur út í eitt. Seinna alneyðuga broytingin er, at teknisku skúlarnir eiga at hava møguleika at taka lærlingarnar inn á skúlan tvær ferðir árliga. Hetta er neyðugt, soleiðis at fyritøkur, sum hava fleiri lærlingar, ikki skulu vera allar lærlingarnar fyri uttan samstundis. Málið liggur nú í Mentamálaráðnum.

1. januar 2017 komu tvær kunngerðir í gildi, sum fara at hava ávirkan á byggivinnuna. Onnur er broyting í útbjóðingarlógini og hin er nýggja bygningskunngerðin.

Tvær broytingar vórðu settar í verk í útbjóðingarlógini frá 1. januar. Onnur broytingin er, at nú er møguligt hjá byggiharrum at heinta tilboð inn talgilt. Hetta merkir tó ikki, at fyritøkur kunnu verða biðnar um at senda tilboðini inn við telduposti, men at ein portalur verður nýttur, sum tryggjar at tilboðið verður verandi afturlatið, til tilboðini skulu latast upp. Hin broytingin í útbjóðingarlógini er, at útboðstilfar nú skal skrivast á føroyskum máli.

1. januar kom bygningskunngerðin eisini í gildi í Føroyum. Bygningskunngerðin ásetur ymiskt krøv til byggingar, umbyggingar og umvælingar, serliga innan bjálving og orkunýtslu. Bygningskunngerðin er eitt týdningarmikið stig mótvegis høgari og støðugari góðsku á bygging. Rætt hevði tí verið at fari undir Meistaraútbúgving í sama viðfangi. Hóskandi hevði verið, at tann, sum nú stendur fyri byggiverkætlanum, fekk enn stinnari førleikar at lyfta uppgávurnar.

Í fíggjarkørmunum fyri 2018 hevur Samferðslumálaráðið sett pening av til at stovna eitt sokallað tunnilslið til Landsverk at umsita. Í dag útinnir Landsverk longu entreprenørvirksemi á fleiri økjum, so sum viðlíkahald av landsvegum og tunlum, fresing og asfaltering, vetrarhald á landsvegunum, umframt framleiðslu og sølu av gróti, skervi og asfalti. Hetta er ein stórur marknaðarpartur, sum Landsverk situr á, og sum eigur at verða útveittur. Vinnan hevur ta greiðu fatan, at jú meira av entreprenørvirkseminum hjá Landsverk verður útveitt, jú fleiri fyritøkur hava møguleikan at sleppa framat, sum eisini eggjar til at nýggjar fyritøkur kunnu spíra. Hetta er gott fyri kappingina og samstundis fyri kostnaðarstøðið á tí arbeiði, sum Landsverk bjóðar út. Tí átti Landsverk heldur at verið loyst frá útinnandi uppgávunum, stovnurin longu hevur í dag, soleiðis at stovnurin heldur fær tikið sær av verkætlanarmenning og uppfylging av teimum verkætlanum, landið varðar av.

## Shippingvinnan

Shipping er nú vorðin ein fastur og støðugur partur av føroyska vinnulívskortinum, og vinnugreinin mennist so líðandi. Ein orsøk til hesa menning, og ein fyritreyt fyri framhaldandi menning, eru teir støðugu karmarnir, sum vinnan hevur havt seinastu árini.

Ikki øll skip og allar lønir í vinnugreinini eru undir FAS, men hesar lønir eru tó ein góð ábending um, at vinnugreinin framhaldandi er týdningarmikil fyri føroyska samfelagið.

**Lønarinntøkur undir FAS (1.000 kr)**




Kelda: TAKS

Á grafinum omanfyri sæst, at lønirnar, sum eru útgoldnar undir FAS, hava vaksið støðugt, men at gongdin nú er meira jøvn. Lønarinntøkurnar eru meira enn tvífaldaðar hesi árini síðan 2010, og gevur shipping og FAS skipanin sostatt eitt munandi ískoyti til peningarenslið inn til Føroya.

Í ársfrágreiðingini í fjør varð víst til kanning, sum sigur at í 2015 var umsetningurin hjá limunum í felagnum millum 1,5 mia. og 2 mia. kr. Ein varlig meting er, at umleið helmingurin av hesum er frá útflutningi. Handilsskipaflotin stendur soleiðis fyri størsta føroyska útflutningsvirðinum aftaná fiskavørur, og er tí ein týdningarmikil partur av føroyska búskapinum.

Í kanning, sum Hans Ellefsen í fjør gjørdi um inntøkur av FAS-skipanini, er niðurstøðan, at tann føroyska FAS-skipanin í 2014 gav tí almenna góðar 60 mió. kr. í eykainntøku, í mun til um eingin FAS-skipan var. Niðurstøðan er eisini, at FAS-skipanin tilsamans fyllir umleið 5% av føroyska heildar-búskapinum (til samanbering fylla fiski- og alivinnan 17%). Eisini er greitt, at nógv fleiri inntøkur kunnu vinnast burtur úr FAS-skipanini.

Kanningin tekur samanum soleiðis:

- FAS skapar tí føroyska landskassanum munandi inntøkur
- FAS skapar inntøkur, sum tann føroyski landskassin annars ikki hevði fingið
- FAS er ein skipan í kapping – menningarmøguleikar eru
- FAS skapar arbeiðspláss við høgari spesialisering
- Stórur vøkstur síðan 2011 – men vøksturin er minkaður tey seinnu árini
- Økt avleitt virksemi síðan 2009
- FAS er ein fongur fyri tað føroyska samfelagið – og kundi verið enn betri

Tað er sostatt ikki at ivast í, at føroyski handilsflotin er ein av avgjørdu vinnuligu styrkjunum í føroyska samfelagnum.

Talan er um eina vinnugrein, sum í stóran mun er regulerað við altjóða sáttmálum og nationalari lóggávu. Tí er tað umráðandi, at karmarnir um vinnugreinina eru støðugir, og at vinna og flagg eru kappingarfør í mun til onnur reiðarí undir øðrum flaggi. Tað hevur stóran týdning, at vinna, politikarar og myndugleikar finna felags stev. Nýggja sjóvinnuálitið, sum varð handa landsstýrismanningum í Uttanríkis- og Vinnumálum fyrr í mánaðinum, er eitt gott og týðandi amboð at stýra eftir.

Tí tað er áhaldandi neyðugt at tryggja kappingarførið hjá føroyska handilsflotanum og eisini hjá Føroya Altjóða Skipaskráseting, og alla tíðina at halda sær fyri eyga, at reglur, mannagongdir og lóggáva í Føroyum ikki virkar kappingaravmarkandi fyri føroysk reiðarí og fyri skipaskrá.

## Oljuvinnan

Leitivirksemi hevur verið á føroyska landgrunninum í eini 15 ár, og níggju brunnar eru boraðir, tó uttan lønandi oljufund. Einki leitivirksemi hevur tó verið á føroyskum øki síðani 2014, og seinastu loyvini vórðu latin inn aftur í 2016. Í mai 2017 verður fjórða útbjóðingarumfar latið upp, og Jarðfeingi hevur luttikið á fleiri ráðstevnum fyri at marknaðarføra komandi útbjóðingarumfar. Eisini hevur Jarðfeingi kannað og tulkað allar dátur av føroyska landgrunninum av nýggjum, og arbeitt við at skilja

betur ta jarðfrøðiligu menningina av føroyska økinum. Jarðfeingi metir tí, at farið verður undir fjórða útbjóðingarumfar við einum betri vitanarstøði enn áður.

Lági oljuprísurin hevur aftur í 2016 ávirka virksemið innan frálandavinnuna, og føroyska veitaravinnan arbeiðir miðvíst við at selja tænastur og veitingar til olju- og sjóvinnuna uttanfyri føroysku landoddarnir. Hetta kom millum annað til sjóndar á messuluttøkuni á ONS 2016 í Stavanger, har føroyski landabásurin marknaðarførdi Føroyar og tær maritimu førleikar og tænastur, sum føroyskir veitarar bjóða. Á ONS 2016 varð eisini skipað fyri tiltaki um føroyskar vinnuførleikar og fjórða útbjóðingarumfar, har millum annað Poul Michelsen, landsstýrismaður í Uttanríkis- og vinnumálum, luttók.

Oljuvinnufelagið hevur í 2016 arbeitt við átaki at staðseta Føroyar sum tænastudepil, bæði innanhýsis í vinnuni, men eisini á messu, í ymiskum tilfari og á heimasíðuni www.maritime-services.com.

## KT-vinnan

2016 var eitt spennandi og aktivt ár í KT-vinnuni. KT-felagið hevur skipað fyri fleiri savnandi tiltøkum, har fokus hevur verið sett á ymisk evni í KT-vinnuni, eitt nú um Talgildu Føroyar og marknaðarføring av KT. KT-felagið hevur eisini støðugt arbeitt við at seta fokus á føroyskar KT-loysnir. Í hesum sambandi hevur felagið sett átøk íverk, sum skulu gera føroysku KT-vinnuna sjónligari. Endamálið við átøkunum er at styrka um tilgongdina av starvsfólki bæði komandi tíðina og við framtíðini í huga, umframt at økja tilvitanina í samfelagnum at keypa føroyskt KT.

#Rita1tíma er føroyska umsetingin av Hour of Code, sum er altjóða átak at læra børn at forrita. KT-felagið hevur sett út í kortið, at allir føroyskir skúlanæmingar skulu sleppa at royna at forrita. Tí setti felagið seg í samband við skúlan á Fløtum, har næmingarnir hava hvør sín teldil, um at royndarkoyra #Rita1tíma. Sigast má, at tiltakið eydnaðist sera væl, og longu vikuna eftir var #Rita1tíma á skránni í Frískúlanum í Havn og á skúlanum á Argjahamri, har allir næmingar frá forskúlanum til 8. flokk forritaðu í ein tíma. KT-felagið hevur sett sær sum mál, at allir næmingar í Føroyum skulu sleppa at royna at forrita í 2017. Longu í januar hevur Runavíkar skúli forritað, og KT-felagið hevur tí góðar vónir at røkka hesum máli.

Talgildu Føroyar er í gongd, og týdningarmikla verkætlanin um samleikan er í útboði. Hetta er ein spennandi verkætlan, sum føroyska KT-vinnan er klár at lyfta.

Bachelorútbúgvingin í KT-verkfrøði á Fróðskaparsetrinum hevur nú virkað í nøkur ár. Hóast nakrar avbjóðingar framvegis eru, er vinnan væl nøgd við útbúgvingina. Nevndin í KT-felagnum samskiftir eisini við Fróðskaparsetrið um at fara undir Master í KT-verkfrøði. Hesum verður arbeitt við.

KT-felagið hevur gjørt vart við, at føroyskt mál ofta ikki verður brúkt í útbjóðingartilfari, soleiðis sum annars er ásett í rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um almenna innkeypspolitikkin. Tó at hetta framvegis kemur fyri, fegnast felagið um, at tað er longri og longri ímillum, at útbjóðingartilfar sæst á útlendskum máli.

Eisini er KT-felagið farið undir at kanna, hvussu nógv KT-fólk eru í Føroyum. Hendan kanning verður liðug á sumri 2017. Endamálið við kanningini er at vita, hvussu nógv KT-fólk eru í Føroyum samanborið við grannalond okkara, og hvussu nógv KT-fólk hóskandi áttu at verið í Føroyum bæði fyri at lyfta verandi uppgávur, men eisini sum ein liður í útviklingini av talgilda samfelagnum.

## Samskiftisvinnan

Síðan fíggjarkreppuna hevur samskiftis- og lýsingarvinnan merkt støðugt vaksandi virksemi og framgongd.

Tað eru tveir stórir veitarar á marknaðinum saman við einum støðugum talið av smærri veitarum, sum í fleiri førum eru einstaklingavirkir.

Vegna vantandi hagtalsgrundarlag er torført at vísa á ein ítøkiligan vøkstur ella fall í vinnugreinini, men afturmeldingar frá vinnuni eru, at talan er um ein størri eftirspurning í 2016 samanborið við undanfarnu árini.

## Ráðgevaravinnan

Nógv virksemi er í byggivinnuni, og merkist tað eisini í ráðgevaravinnuni. Talið av ráðgevaravirkjum og starvsfólkum í vinnuni í Føroyum er vaksandi, og ber hetta boð um vaksandi eftirspurning eftir ráðgevaratænastum. Hagtøl, sum Ráðgevarafelagið innheintar frá limunum, vísa, at samlaði umsetningurin í vinnuni er øktur úr 122 mió. kr. í 2015, uppí 145 mió. kr. í 2016. Hetta er ein vøkstur uppá 19% uppá eitt ár. Samanborið við 2011, sum var fyrsta árið kanningin varð gjørd, hevur vøksturin hesi 6 árini verið umleið 86%.

Føroyska ráðgevaravinnan hevur drúgvar royndir og breiða vitan um øll sløg av arbeiðum, sum tørvur er á at fáa gjørt í Føroyum. Strembað verður eftir, at hetta eisini í framtíðini verður so, tí fyrimunirnir eru nógvir. Í fyrsta lagi verða vitanarstørv varðveitt í landinum, og í øðrum lagi er ráðgevingin smidligari, tá hon verður veitt í nærumhvørvinum. Í triðja lagi eru føroysku tímatakstirnir lægri enn i grannalondunum. Harafturat kemur, at føroyska samfelagið hevur stórt gagn av, at vitanin um at byggja bygningar og aðra nýgerð eftir føroyskum fortreytum verður varðveitt og ment her á landi.

Tað verður áhaldandi arbeitt við at ávirka soleiðis, at føroyskar ráðgevarafyritøkur fáa javnbjóðis atgongd til allar føroyskar verkætlanir. Arbeitt verður eisini fyri at fáa gjøgnumskygni í sambandi við tilluting og døming av útboðum. Smáir batar hava verið at sæð, men enn manglar nakað, áðrenn støðan er nøktandi.

## Handilsvinnan

Støðan í handilsvinnuni er sum heild góð. Tað sæst eisini á innflutningstølunum, sum samlað sæð eru vaksin rættiliga støðugt seinastu árini. Tó er vøksturin nakað hóvligur í mun til, hvussu góðar tíðirnar eru í løtuni. Sambært Búskaparráðnum er nýtslukvotan hjá føroyingum als ikki komin aftur á tað støðið, sum hon var á undan fíggjarkreppuni. Hildið verður, at fólk heldur leggja tøka pening sín til síðis, heldur enn at brúka hann til privata nýtslu.

### Innflutningur

Sum tað sæst á talvuni niðanfyri, hevur innflutningurin av matvørum verið støðugt vaksandi síðani 2011. Matvørulógin var fyri stuttum liberaliserað, soleiðis at heimaframleiðsla, tað vil siga føroysk framleidd vøra, sum ikki er løggild, kann seljast í handlunum. Um hetta átak hevur borið vøkstur við sær, er tað ikki at síggja í tølunum niðanfyri, av tí at talan her bert er um innfluttar vørur.




Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningurin av hálvdrúgvum nýtsluvørum er sum heild vaksin í mun til 2015. Vøksturin liggur millum 5% og 11%, tó liggur vøksturin á fótbúnaði á einans einum góðum prosenti.




Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningurin av drúgvum nýtsluvørum er eisini vaksin. Vøksturin á innflutninginum av persónbilum er tó minkaður aftur á smá 11% samanborið við 25,6% í 2016.




Kelda: Hagstova Føroya

Innflutningurin av gerandisvørunum, teim ódrúgvu vørunum, fylgir í stóran mun lønarútgjaldingunum sama tíðarskeið. Stórsti vøksturin síðani fíggjarkreppuna er í hálvdrúgvu og drúgvu vørunum.

Sølan av bilum gevur vanliga eina ábending um, hvussu búskapurin hevur tað, og um vanligi brúkarin hevur álit á framtíðina.

Alt bendir á, at støðan er heilt góð í løtuni. Sølan av nýggjum bilum í 2016 er vaksin við 6,7% í mun til 2015. Vøksturin hevur verið stórur seinastu árini, og tað kann hugsast, at tey sum leingi hava ætlað at keypt sær nýggjan bil, nú hava gjørt tað.




## Talgilding og alheimsgerð

Handilsvinnan er saman við øðrum vinnum í eini skiftistíð, har talgildingin krevur, at íløgur skulu gerast í tøkniliga menning. Tað er týdningarmikið, at eggjað verður til, at nýggj tøkni verður brúkt, og at tað samstundis verður syrgt fyri, at somu reglur eru galdandi fyri øll á marknaðinum. Lógir og reglur mugu verða nútíðarhóskandi og tryggja, at nýggir møguleikar kunnu verða gagnnýttir.

Í brotinum omanfyri verður innflutningurin til Føroya umrøddur, men eitt, sum ikki verður nevnt, er privati innflutningin av vørum, sum hava eitt virði á undir kr. 300, og sum tískil kunnu innflytast toll- og MVG frítt til Føroya. Tøl fáast ikki til vega fyri henda innflutning, men tøl úr øðrum londum vísa, at hesir pakkar vaksa skjótt í tali. Talan er um mistar inntøkur til landið og mistar inntøkur til handilsvinnuna. Fyri føroysku handilsvinnuna eru hesar ásetingar kappingaravlagandi, og tær hava ikki sín líka í londum, sum vit vanliga samanbera okkum við, har smálutamarkið liggur væl lægri enn í Føroyum.

Áhugavert hevði verið at sæð, hvussu samlaði innflutningurin til privata nýtsluna sá út, um privati innflutningurin av vørum undir smálutamarkinum vóru við í uppgerðini.

## *Ferðavinnan*

Tað gongur framá í ferðavinnuni. Gistingartølini hjá Hagstovuni vísa á ein javnan mánaðarligan vøkstur ár fyri ár. Seinastu árini hava gistingarhús bygt út, og nýggj eru stovnað. Hetta merkir, at fleiri kømur eru løgd afturat, men hóast tað er ein bati at síggja í gistitalinum hjá gistingarhúsunum. Í talvuni niðanfyri sæst gongdin á gistingarnætunum hjá gistingarhúsunum kring landið. Í 2016 vóru skrásettar íalt 159.759 gistingarnætur.




Kelda: Hagstova Føroya

Tað sæst, at lítil vøkstur er at síggja samanborið við 2015. Gistingarhúsini høvdu tó eina framgond á 8%, meðan aðrir gistingarhættir sum til dømis leiga av húsum og íbúðum høvdu stóra afturgongd. Hildið verður, at ein orsøk er privatu gistingarnar, sum ikki verða skrásettar. Tað vil siga gistingar, sum eru bókaðar gjøgnum serliga AirBnB, sum ikki vil lata sínar upplýsingar víðari.

Á myndlinum niðanfyri sæst, hvussu býtið er millum ferðafólk frá teimum londunum, hvørs gistingarnætur í Føroyum eru flestar. Millum hesi londini er størstur vøkstur í týsku gistingunum. Eins og í fjør eiga føroyingar sjálvir ein stóran part av lagkøkuni, hóast vøksturin ikki er tann sami, sum hann hevur verið undanfarin ár.




Kelda: Hagstova Føroya

Ferðafólkaflutningurin til Føroya heldur fram at vaksa. Talvan niðanfyri telur bæði føroyingar og útlendingar. Síðst í mars í ár fór SAS at flúgva til Føroya eina ferð um dagin, so væl fleiri komur eru væntandi komandi árið.




Kelda: Vága Floghavn og Smyril Line

Vaksandi ferðavinnan hevur fingið Uttanríkis- og vinnumálaráðið at seta ein arbeiðsbólk at gera eina heildarætlan fyri framtíðarmenningina av ferðavinnuni í Føroyum. Henda ætlan er júst løgd fram. Heildarætlanin tekur støði í burðardyggari

ferðavinnu og fevnir um uppskot til eina skynsamari skipan av ferðavinnuni innanlands.

Hóast vøkstur í ferðavinnuni er tað framvegis ein avbjóðing at fylla gistingarhúsini uttan fyri háárstíð.

Um vit hyggja at gistingum á gistingarhúsum, sæst at slakastu mánaðirnir eru januar, februar og desember. Um gongdin í 2016 verður samanborin við gongdina í 2013, sæst at talan er um fleiri gistingar, og at ferðavinnuárið byrjar fyrr á árinum enn áður.

### Gistingar á gistingarhúsum




Kelda: Hagstova Føroya

Hagstova Føroya hevur eftir áheitan frá Visit Faroe Islands kannað búskaparliga týdningin av føroysku ferðavinnuni farna árið. Sambært hesum tølum, sum tó bert eru tøk til og við 2015, var umsetningurin til útlendsk ferðandi 665 mió kr. Hóast ivamál er um tølini av ársverkum, verða tey mett at verða 470 í 2015, men tá eru bert flutningsfeløg, ferðaskrivstovur, gistingar- og hotellvirksemið tikin við. Matstovur, upplivingarveitarar og ferðaleiðarar eru ikki roknað uppí.

Eitt av aðalmálunum hjá landinum er í løtuni, at innanlands ferðavinnan skal skipast betur. Um hetta mál skal røkkast, mugu tilboð skapast í teimum økjum í landinum, sum ynskja ferðavinnuna. Í miðstaðarøkinum hevur ein fjølbroytt matstovuvinna ment seg, og hevur fremsta matstova okkara gjørt seg uppiborna at fáa eina Michelin stjørnu. Hetta stendur tíverri í andsøgn við støðuna í restini av landinum. Ikki tí at gourmet matstovur skulu verða í hvørjari bygd, men tí at tað snøgt sagt mangla matarstøð kring landið, har føroysk og útlendsk ferðandi kunnu fáa ein góðan bita og okkurt gott afturvið. Tað er tí neyðugt við tiltøkum, sum kunnu nøra um matstovuvinnuna kring landið.

Sum støðan er í dag, er ikki stórvegis vinningur í matstovuvinnuni. Hetta kemst einamest av føroysku innkeypsskipanini av øl og víni, har landið hevur einkarrætt at flyta inn øl og vín. Matstovur skulu tískil fremja teirra innkeyp gjøgnum einkarsøluna.

Í ferðavinnuni er breið semja um, at best er, at innkeypsmonopolið hjá Rúsdrekkasølu Landsins verður avtikið, soleiðis innkeypið kann fara fram á handilsligum grundarlagi og í samsvari við innkeypsskipanir í øðrum norðurlondum. Hetta skal gerast, uttan tað á nakran hátt skalar sølumonopolið hjá Rúsdrekkasølu Landsins, sum framhaldandi verður einasta sølustað fyri rúsdrekka.

## *Ídnaðarvinnan*

Føroysk ídnaðarframleiðsla er eyðkend við einum ella fáum fyritøkum av sama slagi. Her er t.d. talan um matvøruframleiðslu, framleiðslu av reingerðarevnum, bryggjarí og prentsmiðjur.

Felags fyri fyritøkurnar er, at tær virka í stórari kapping við líknandi vørur frá øðrum marknaðum. Tað sær tó út til, at føroysku fyritøkurnar hava ein lutfalsligan støðugan og stóran marknaðarpart í Føroyum, og hetta er at fegnast um.

Rákið at keypa lokalar og upprunaligar vørur saman við góðu tíðunum, vit síggja í føroyska samfelagnum í løtuni, er komið flestu av hesum fyritøkum til góðar.

Eftirspurningurin eftir og áhugin fyri føroyskum matvørum tykist nú at smitta yvir á onkrar av framleiðslunum, sum hava tilknýti til matvøruvinnuna. Fyri matvøruframleiðandi partin av ídnaðinum kom nýggja matvørulógin í gildi 1. oktober 2016, og hóast tillagingar eru partar av vinnuni framhaldandi ikki fegnir um broyttu lógarkarmarnar.

Tá tað kemur til aðrar ídnaðarvørur so sum vaskievnir, prentlutir o.l., eru fyritøkurnar undir sera stórum kappingartrýsti frá útlendskum vørum. Framgongdin í samfelagnum annars kemur kanska nakað seinni til hesar fyritøkurnar enn fyritøkur í øðrum vinnugreinum.

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag, Vinnuhúsið og feløgini annars

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar. Felagið arbeiðir fyri, at føroyskt vinnulív hevur teir bestu møguleikarnar at kappast, mennast og virka. Við samráðingum og sáttmálum tryggjar Arbeiðsgevarafelagið samstundis góðar og støðugar arbeiðsmarknaðar-karmar fyri vinnuna.

Í Føroya Arbeiðsgevarafelag eru føroyskar fyritøkur umframt arbeiðsgevarasamskipanir limir. Arbeiðsgevarasamskipanirnar eru Føroya Handverksmeistarafelag, Føroya Prentsmiðju-felag, Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum og Reiðarafelagið fyri Farmaskip. Fyritøkur, sum ikki hoyra til virkisøkini hjá teimum fýra arbeiðsgevarasamskipanunum, sum eru nevndar omanfyri, hava beinleiðis limaskap í Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**Endamálið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag:**

- **Felags sáttmálar fyri vinnuna:** Vegna vinnuna ger Arbeiðsgevarafelagið sáttmálar við løntakarafeløgini. Hesir tryggja støðug viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum og tálma lønarvøkstur í mestan mun.
- **Ráðgeving og tænasta:** Felagið veitir limum sínum ráðgeving og tænastur á ymiskum økjum: starvsfólkaviðurskifti og leiðsla, sáttmálar, lógir og reglugerðir á vinnuøkinum v.m. Harumframt virkar umsitingin í Vinnuhúsinum sum sambindingarlið við vinnu í øðrum londum, partvíst gjøgnum samstarv okkara við vinnufeløg í grannalondunum og partvíst, tí at útlendsk feløg, sum vilja samstarva við føroyska vinnu, venda sær til felagið.
- **Politisk ávirkan:** Vinnunar vegna verður arbeitt við at ávirka allar tær lógir og reglugerðir, sum landsstýri, løgting, umsiting, stovnar og kommunur seta í verk, soleiðis at hesar tæna og ikki darva vinnuni. Talan er her um yvirskipaðar vinnupolitiskar karmar, ikki serstakar karmar fyri ávísar vinnugreinar. Arbeiðsgevarafeløgini eru umboðað í nógvum ymiskum stýrum, nevndum og ráðum, ið seta karmar fyri føroyska samfelagið og framtíð okkara. Her gera umboðini sína ávirkan galdandi, so vinnusjónarmið vinna frama. Hetta tryggjar limum okkara, at tað eisini framyvir gerst liviligt hjá fólki við fyritakssemi og hugskotum. Feløgini gera sostatt alt fyri at ávirka skipanir, sum eru viðkomandi fyri vinnuna.
- **Kunning:** Føroya Arbeiðsgevarafelag veitir kunning um privatu vinnuna, vinnulig viðurskiftir og tann týdning, vinnan hevur fyri samfelagið, bæði úteftir og gjøgnum føroyskar miðlar. Felagið skipar eisini fyri kunningartiltøkum fyri limunum. Hetta snýr seg í mestan mun um broytingar í lóggávu, sáttmálum o.l.
- **Fundir og orðaskifti** í vinnuni: Føroya Arbeiðsgevarafelag nýtir Vinnuhúsið sum miðdepil fyri vinnuligum og vinnupolitiskum orðaskifti, og har verða bond knýtt millum leiðarar í privatu vinnunu, eisini tá Vinnuhúsið er karmur um vitjanir uttaneftir. Arbeiðsgevarafelagið setur eisini eftir tørvi arbeiðsbólkar at greina mál og stevnur fyri føroyska vinnu. Mál og stevnur, sum ofta gerast hornasteinar í almenna vinnupolitikkinum hjá felagnum.

Lógir Føroya Arbeiðsgevarafelags og onnur kunning um felagið og Vinnuhúsið eru lýst nærri á heimasíðuni hjá Vinnuhúsinum www.industry.fo.

Nevnd Føroya Arbeiðsgevarafelags verður vald á árliga aðalfundinum. Í lógunum hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur, at nevndin skal veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.

Føroya Arbeiðsgevarafelag eigur Vinnuhúsið saman við Havnar Handverksmeistarafelag. Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri rakstrinum av Vinnuhúsinum og bjóðar vinnugreinafeløgum at húsast í húsinum. Vinnuhúsið er felags marknaðarføringsheitið á virkseminum hjá arbeiðsgevarafeløgunum og vinnugreina-feløgunum í Vinnuhúsinum.

# Hvør húsast í Vinnuhúsinum?

Í dag eru 14 virkin feløg undir sama taki í Vinnuhúsinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur ta hugsan, at tað hevur týdning at savna føroyska vinnu undir einum taki. Hetta fyri at føroyska vinnan skal hava sterkari samleika í samfelagnum gjøgnum felags umboðan.

**Arbeiðsgevarafeløgini eru:**

| Arbeiðsgevarafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Føroya Arbeiðsgevarafelag | Marita Rasmussen |
| Føroya Handverksmeistarafelag (íroknað Havnar Handverksmeistarafelag) | Marius Thomassen |
| Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum | Esther Dahl |
| Føroya Prentsmiðjufelag | Esther Dahl |
| Reiðarafelagið fyri Farmaskip | Esther Dahl |

Høvuðsuppgávan hjá arbeiðsgevarafeløgunum er at føra sáttmálasamráðingar við fakfeløgini vegna limirnar og at ráðgeva limunum í sáttmála og arbeiðsmarknaðarspurningum.

Harafturat arbeiða arbeiðsgevarafeløgini eisini við arbeiðsmarknaðarmálum og yvirskipaðum vinnukørmum.

**Vinnugreinafeløgini eru:**

| Vinnugreinafeløg | Ábyrgd |
|---|---|
| Havbúnaðarfelagið | Niels Winther |
| Føroya Ráfiskakeyparafelag | Niels Winther |
| Handilsvinnufelagið | Birita Johansen |
| KT-felagið | Marius Thomassen |
| Oljuvinnufelagið | Jórun Gardar |
| Samskifti | Jórun Gardar |
| Ráðgevarafelagið | Marita Rasmussen |
| Ferðavinnufelagið | Birita Johansen |

Vinnugreinafeløgini fáast við spurningar, ið eru viðkomandi fyri teirra vinnugrein.

Vinnugreinafeløgini arbeiða sjálvstøðugt við sínum málum.

Størri mál, sum viðkoma fleiri vinnugreinum ella allari vinnuni, verða samskipað av umsitingini í Vinnuhúsinum og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Vinnugreinafeløgini hava ikki ábyrgd av sáttmálasamráðingum.

## Føroya Reiðarafelagið og Felagið Nótaskip

Seinastu árini hevur Felagið Nótaskip leigað skrivstovu í Vinnuhúsinum og frá 1. mai 2013 eisini Føroya Reiðarafelag.

## Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag setur karmarnar fyri arbeiðið í Vinnuhúsinum.

Í nevndini sita:



### Bergur Poulsen, formaður

Bergur Poulsen er nevndar-formaður í Eystur- og Sandoyartunlar og nevndarlimur í øðrum fyritøkum í føroyskum vinnulívi. Bergur Poulsen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



### Høgni Hansen, næstformaður

Høgni Hansen er stjóri í heilsølufyritøkuni Poul Hansen. Høgni Hansen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011 og sum næstformaður felagsins síðan tá. Høgni Hansen var eisini nevndarlimur í Havnar Arbeiðsgevarafelag, áðrenn felagið varð avtikið.



### Kristoffur Laksá, nevndarlimur

Kristoffur Laksá er samráðingarleiðari Føroya Arbeiðsgevarafelags. Hann er eisini nevndarlimur í Fiskaaling og sat í nógv ár í nevndini í Føroya Prentsmiðjufelag. Kristoffur Laksá hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 1993.



### Jón Sigurdsson, nevndarlimur

Jón Sigurdsson er stjóri og stovnari av byggifyritøkuni Articon. Hann er eisini nevndarlimur í øðrum føroyskum fyritøkum. Jón Sigurdsson hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2004.



### Atli Gregersen, nevndarlimur

Atli Gregersen er saman við øðrum eigari av fyritøkunum Luna, Fútaklettur og Fiskavirkinum. Atli Gregersen er stjóri í alifyritøkunum Luna og Fútaklettur. Atli Gregersen hevur sitið í nevndini í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2011. Atli Gregersen er eisini nevndarlimur í Havbúnaðarfelagnum.



### Fróði Magnussen, nevndarlimur

Fróði Magnussen er stjóri á KT-fyritøkuni Formula. Fróði Magnussen hevur verið formaður í KT felagnum og er framvegis nevndarlimur har, umframt í øðrum føroyskum fyritøkum. Fróði Magnussen hevur sitið í nevndini fyri Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.



### Bogi Jacobsen, nevndarlimur

Bogi Jacobsen er stjóri í framleiðslu og útflutnings-fyritøkuni Varðin Pelagic. Harumframt er Bogi Jacobsen nevndarlimur í P/F Varðin og P/F Fossá. Bogi Jacobsen hevur sitið sum nevndarlimur í Føroya Arbeiðsgevarafelag síðan 2014.